umhvørvisstovan skógrøkt

# Lýsing av viðarvøkstri í Føroyum.

Lýsingin er ikki fullfíggjað, men er ætlað sum ein stuttorðað leiðbeining. Lýsingin tekur støði í okkara samlaðu royndum av plantunum yvir eitt longri tíðarbil; bæði á Gróðurstøðini í Miðhoydølum, í viðarlundunum, men eisini í ymsum gørðum kring landið.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Abies | alba | | Evropaaðalgrann | Stórvaksið nálatræ. Nálirnar dimt grønar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst tó best í moldkendari jørð og góðari lívd. Tolir nakað av skugga. Hóskar væl sum staktræ, og t.d. at dyrka sum jólatræ ella prýðisgreinar. Natúrlig útbreiðsla: Miðevropa. | **2** |
| Abies | homolepis | | Nikkoaðalgrann | Stórvaksið nálatræ. Nálirnar hava ofta eitt heldur gulgrønt dæmi, tær eru rísnar og prika. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst tó best í moldkendari jørð og góðari lívd. Hóskar væl sum staktræ. Natúrlig útbreiðsla: Japan. | **2** |
| Abies | koreana | | Koreaaðalgrann | Lítið nálatræ. Sera snotuligt og tættvaksið vakstrarlag. Nálirnar blágrønar og tættar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst tó best í moldkendari jørð og góðari lívd. Er vælegnað, har lítið pláss er. Natúrlig útbreiðsla: Korea. | **2** |
| Abies | procera | | Nobilaðalgrann | Stórvaksið nálatræ. Er helst hin harðførasta av Aðalgrannunum her á landi. Nálirnar blágrønar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst tó best í moldkendari jørð og góðari lívd. Hóskar væl sum staktræ, og t.d. at dyrka sum jólatræ ella prýðisgreinar. Natúrlig útbreiðsla: Útnyrðingsnorðuramerika. | **2** |
| Abies | veitchii | | Veitch-aðalgrann | Stórvaksið nálatræ. Nálirnar benda ofta uppeftir, tær eru myrkagrønar á rættuni, og eru nærum heilt hvítar á ranguni. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst tó best í moldkendari jørð og góðari lívd. Hóskar væl sum staktræ, og t.d. at dyrka sum prýðisgreinar. Natúrlig útbreiðsla: Japan. | **2** |
| Acer | pseudoplatanus | | Ahorn | Stórvaksið og breiðvaksið leyvtræ, ið eldist væl. Harðført, men missir vakstrarlagið í slitvindi. Skuggar nógv, og tískil minni hóskiligt, har lítið pláss er. Bløðini átøk merkinum í tí kanadiska flagginum. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst tó best í moldkendari jørð og góðari lívd. Telist millum tey leyvtræsløgini, ið hava verið roynd longst her á landi. Natúrlig útbreiðsla: Miðevropa. | **2** |
| Alnus | cordata | | Hjartablaðað elri | Miðalstórt leyvtræ. Bløðini hanga grøn á trænum serliga leingi um heystið. Krevur tey alrabestu vakstrarlíkindini. Rótin bindur køvievni úr luftini, og plantan bøtir tí serliga væl um jørðildið. Natúrlig útbreiðsla: Suðurevropa. Okkara tilfar: úr Danmark og Skotlandi. | **1** |
| Alnus | glutinosa | | Svartelri | Miðalstórt leyvtræ. Eingi stórvegis krøv til jørðildið, trívst tó best í góðari mold. Rótin bindur køvievni úr luftini, og plantan bøtir tí serliga væl um jørðildið. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. Okkara tilfar: úr Skotlandi. | **1** |
| Alnus | incana | | Gráelri | Miðalstórt leyvtræ. Rótin bindur køvievni úr luftini, og plantan bøtir tí serliga væl um jørðildið. Kann breiða seg við rótskotum. Trívst best í gloprutari eyrkendari jørð. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til lívdargirðing. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. Okkara tilfar: | **1** |
| Alnus | rubra | | Reyðelri | Skjótvaksandi, miðalstórt leyvtræ. Rótin bindur køvievni úr luftini, og plantan bøtir tí serliga væl um jørðildið. Trívst best í eyrkendari jørð. Enn eru eingi gomul trø av slagnum her á landi, men alt bendir á, at slagið trívst væl hjá okkum. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til lívdargirðing. Natúrlig útbreiðsla: Útnyrðingsnorðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Alaska. | **2** |
| Alnus | sinuata | | Sitkaelri | Harðført, skjótvaksandi, miðalstórt leyvtræ. Verður ikki elligamalt træ. Rótin bindur køvievni úr luftini, og plantan bøtir tí serliga væl um jørðildið. Telist millum frægastu leyvtræssløgini hjá okkum. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til lívdargirðing. Natúrlig útbreiðsla: Útnyrðingsnorðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Alaska. | **3** |
| Amelanchier | lamarckii | | Snjómispil | Hávaksin leyvfellandi runnur. Nýspretti bløðini eru reydlig á liti, og runnurin fær fagurlitt heystarleyv. Hvítar blómur í hópatali. Natúrlig útbreiðsla: Norðuramerika, men slagið hevur breitt seg í Vesturevropa í eini 200 ár. Okkara tilfar: úr Danmark. Lítið royndur áður. | **0** |
| Aralia | elata | | Háaralia | Stórvaksin runnur ella lítið  træ. Veturgrønur. Bløðini stórvaksin, minna um Sløkju ella Hvonn. Blómurnar hvítar. Breiður seg við rótskotum. Hóskar væl sum stakrunnur ella í samanplantingum. Lítið royndur áður. Bretar kalla runnin 'Japanskt sløkjutræ'. Natúrlig útbreiðsla: Japan. | **0** |
| Araucaria | araucana | | Aputræ | Stórvaksið nálatræ. Ógvuliga sermerkt vakstrarlag. Bløðini eru hvøss sum knívsegg. Krevur tey alrabestu vakstrarlíkindini. Úr Suðuramerika. | **1** |
| Aristotelia | fruticosa | | Aristotelia | Miðalhøgur veturgrønur runnur. Trívst bert í góðum vakstrarlíkindum. Úr Nýsælandi. | **1** |
| Aronia | melanocarpa | | Súrberjarunnur | Lágur runnur. Fagurlitt leyv um heystið. Hvítar blómur, og svørt, glinsandi ber. Eingi stórvegis krøv til vakstrarstaðið. Natúrlig útbreiðsla: Landnyrðingsnorðuramerika. | **2** |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

© Umhvørvisstovan - Endurskoðað útgáva juli 2011

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Aronia | prunifolia | 'Kolorit' | Súrberjarunnur | Lágur runnur. Fagurlitt leyv um heystið. Hvítar blómur, og purpurlitt, glinsandi ber. Eingi stórvegis krøv til vakstrarstaðið. Natúrlig útbreiðsla: Landsynningsnorðuramerika. | **0** |
| Athrotaxis | cupressoides | | Athrotaxis | Sermerkt minni nálatræ. Tørvar tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góðan sólargang, góða lívd og góða jørð. Úr Tasmania. | **1** |
| Aucuba | japonica | 'Crotonifolia' | Aucuba 'Crotonifolia' ♀ | Veturgrønur runnur. Bløðini leðurkend við gulum blettum. Kvennplanta. Reyðar fruktir. Lítið royndur áður. Úr Japan. | **0** |
| Azara | lanceolata | | Azara | Lágvaksin veturgrønur runnur. Smá, fagurgrøn bløð. Smáar, angandi gular blómur. Krevur tey alrabestu vakstrarlíkindini, t.e. serliga góða lívd. Úr Suðuramerika. | **1** |
| Baccharis | magellanica | | Baccharis | Heilt lágur, krúpandi og tættvaksin, veturgrønur runnur. Úr Eldlandinum. | **2** |
| Baccharis | patagonica | | Baccharis | Lágur, tættur, veturgrønur runnur. Tolir skugga. Hóskar væl til lágt, tætt, kjarr. Úr Eldlandinum. | **2** |
| Berberis | aggregata | | Berberis | Tættvaksin, leyvfellandi, lágur runnur. Ljósagular blómur í stórum tali, og nógv reyð ber um heystið. Eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sólargang. Úr Vesturkina. | **3** |
| Berberis | candidula | | Berberis | Lágur, tættur, veturgrønur runnur við kúpuskapi. Skyggjandi, dimmgrøn bløð, silvurlitt á ranguni. Bjartgular blómur. Eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sólargang. Úr Vesturkina. | **2** |
| Berberis | darwinii | | Darwin-berberis | Høgur, tættvaksin, veturgrønur runnur. Skyggjandi, dimmgrøn bløð. Dimmgular ella brandgular blómur. Eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sólargang. Úr Suðuramerika. | **1** |
| Berberis | gagnepainii | | Berberis | Lágur, tættvaksin, veturgrønur runnur við rættvaksnum greinum. Trístrentar tornir. Bjartgular blómur og svørt ber við bláari hinnu. Hóskar væl til ófarandi girðing. Úr Vesturkina. | **2** |
| Berberis | ilicifolia | | Kristtornaberberis | Høgur, heldur tættvaksin, veturgrønur runnur. Skyggjandi, dimmgrøn bløð, átøk Kristtorn. Brandgular blómur, tíðliga á vári og aloftast eisini aftur um heystið. Dimmblá ber, ið smakka væl. Tolir nakað av skugga. Trívst væl hjá okkum í hampiligari lívd og góðari jørð. Natúrlig útbreiðsla: Suðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Eldlandinum. | **3** |
| Berberis | linearifolia | 'Orange King' | Berberis 'Orange King' | Høgur, tættvaksin, veturgrønur runnur. Skyggjandi, dimmgrøn bløð. Brandgular blómur, tíðliga á vári. Smá krøv til jørðildið. Úr Suðuramerika. | **2** |
| Berberis | thunbergii | | Berberis | Lágur, tættvaksin, leyvfellandi runnur. Serliga fagurlitt leyv um heystið. Reyðgular blómur á miðjum sumri og bjartreyð ber. Eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sólargang. Úr Japan. | **3** |
| Berberis | thunbergii | 'Atropurpurea' | Berberis 'Atropurpurea' | Lágur, tættvaksin, leyvfellandi runnur. Leyvið reydligt longu um várið, við bjartari liti um heystið. Reyðgular blómur á miðjum sumri og bjartreyð ber. Smá krøv til jørðildið. Úr Japan. | **3** |
| Berberis | verruculosa | | Berberis | Lágur, tættvaksin, seinvaksin, veturgrønur runnur. Trístrentar, langar tornir. Skyggjandi, dimmgrøn bløð. Bjartgular blómur. Eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sól. Úr Vesturkina. | **1** |
| Berberis x | carminea | 'Buccaneer' | Berberis 'Buccaneer' | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Fagurlitt leyv um heystið. Sermerktur fyri tey stóru, nógvu, dimmreyðu berini. Eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sólargang. Lítið royndur áður. | **0** |
| Berberis x | stenophylla | | Berberis | Lágur veturgrønur runnur við longum, bogavaksnum greinum. Gular blómur. Vælumtóktur, eisini hjá okkum. Eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sólargang. | **2** |
| Betula | papyrifera | | Pappírsbjørk | Verður stórt mjávaksið leyvtræ. Klárar seg bert í bestum vakstrarlíkindum. Hvítan, pappírskendan børk. Úr Útnyrðingsnorðuramerika. | **-1** |
| Betula | pendula | | Heingibjørk | Verður stórt leyvtræ. Klárar seg bert í bestum vakstrarlíkindum. Trívst best í djúpari, gloprutari mold. Eldri trø hvítan, skorpnaðan børk. Lítið roynt áður. Úr Norðurevropa. | **-1** |
| Betula | pubescens | | Dúnbjørk | Harðført og skjótvaksandi leyvtræ, ið verður miðalstórt. Hóskar væl bæði sum staktræ og í størri lívdarálum. Var upprunavøkstur í Føroyum fram til landnámstíðina. Úr Norðurevropa. | **3** |
| Brachyglottis | bidwillii | | Brachyglottis | Lágur, tættvaksin, veturgrønur runnur. Bløðini tjúkk og filtloðin, grálig á liti. Blómurnar gular. Harðførur. Tolir væl sjóráma. Fjallarunnur úr Nýsælandi. | **3** |
| Brachyglottis x | | Dunedin Hybrids | Brachyglottis | Lágvaksin til miðalhøgur veturgrønur runnur. Bløðini stórvaksin og leðurkend. Bløð og kvistar filtloðin, rættan á bløðunum sum frá líður | **3** |



Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

© Umhvørvisstovan - Endurskoðað útgáva juli 2011

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | ber. Brandgular blómur frá ólavsøkuleitinum og alt heystið. Skal helst plantast í grús- og eyrjørð. Avbrigdið er blendingur, ofta miskent sum m.a. *Brachyglottis greyi* ella *Senecio greyi*. Okkara tilfar: av skotskum uppruna. | |
| Brachyglottis x | | 'Sunshine' | Brachyglottis 'Sunshine' | Lágvaksin, veturgrønur runnur. Tey ungu bløðini eru silvurgrá. Blómurnar gular, halda sær væl alt seinsummarið. Trívst væl í góðari mold og hampiligari lívd. Nær í ætt við Senekio. Úr Nýsælandi. | 3 |
| Buddleia | globosa | | Firvaldarunnur | Hávaksin veturgrønur/lutvíst veturgrønur runnur. Gloprut vakstrarlag. Nógvar brandgular blómur á miðjum sumri. Hampiliga harðførur, trívst best í moldríkari jørð, og í nógvum ljósi. Kall- og kvennplantur hvør sær. Natúrlig útbreiðsla: Suðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr syðra parti av Argentina. | 3 |
| Buddleia x | | 'Lochinch' | Firvaldarunnur | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Angandi blómur, blálittar við brandgulari fyllu. | 1 |
| Buxus | sempervirens | 'Arborescens' | Buksbom | Seinvaksandi veturgrønur runnur, ið er kendur fyri at tola serliga væl at verða tilskorin. Krevur tey alrabestu vakstrarlíkindini. Úr Suðurevropa. | -1 |
| Callistemon | sieberi | | Kallistemon | Lágvaksin, tættur, veturgrønur runnur. Bløðini eru nálvaksin, og blómurnar ljóst gulir broddar. Trívst best í nógvari sól, góðari lívd og moldkendari jørð. Sera sjáldsamur runnur, av Myrtuættini. Úr Tasmania. | 1 |
| Calluna | vulgaris | 'Allegro' | Heiðalyngur 'Allegro' | Krúpandi veturgrønur runnur. Rubinreyðar blómur og dimmgrøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Calluna | vulgaris | 'Dark Beauty' | Heiðalyngur 'Dark Beauty' | Krúpandi veturgrønur runnur. Myrkareyðar blómur og dimmgrøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Calluna | vulgaris | 'Easter Bonfire' | Heiðalyngur 'Easter Bonfire' | Krúpandi veturgrønur runnur. Bleikt reydligar blómur og heldur bleikt grøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Calluna | vulgaris | 'Goldflame' | Heiðalyngur 'Goldflame' | Krúpandi veturgrønur runnur. Myrkt reyðar blómur. Bløðini litbroytast gjøgnum árið; heldur brandgul um várið, gulgrøn um summarið og bronsulitt um veturin. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Calluna | vulgaris | 'Low White' | Heiðalyngur 'Low White' | Krúpandi veturgrønur runnur. Hvítar blómur og grøn bløð við bláligum dæmi. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Calluna | vulgaris | 'Peter Sparks' | Heiðalyngur 'Peter Sparks' | Krúpandi veturgrønur runnur. Fyltar, ljósareyðar blómur og grøn bløð við gráligum dæmi. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Calluna | vulgaris | 'Schurig's Sensation' | Heiðalyngur 'Schurig's Sensation' | Krúpandi veturgrønur runnur. Stórvaksnar, fyltar purpurreyðar blómur og dimmgrøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Calluna | vulgaris | 'Tricolorifolia' | Heiðalyngur 'Tricolorifolia' | Krúpandi veturgrønur runnur. Reyðbláar blómur. Bløðini litbroytast gjøgnum árið; dimmgrøn um summarið og brúnlig um veturin. Nýggju skotini reydlig um várið. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Calluna | vulgaris | 'Wickwar Flame' | Heiðalyngur 'Wickwar Flame' | Krúpandi veturgrønur runnur. Ljóst bláreyðar blómur. Bløðini litbroytt gjøgnum árið; gullig um summarið, gylt um heystið og bronsulitt ella reydlig um veturin. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar. | 2 |
| Cassinia | vauvilliersii | | Fjallakassinia | Lágvaksin, tættur, veturgrønur runnur. Bløðini lítil og tøtt. Blómurnar lítið ásýnligar, runnurin verður tí mest nýttur vegna tann grøna litin. Harðførur. Trívst best í nógvari sól og lættari, gloprutari jørð. Sæst við hvørt av misgáum lýstur í slektini Ozothamnus. Úr Nýsælandi. | 3 |
| Ceanothus | | 'Autumnal Blue' | Ceanothus 'Autumnal Blue' | Veturgrønur runnur. Dimmbláar blómur. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og góða, vælavveitta, kálkríka mold. Ikki royndur áður. 'Amerikansk syren.' | 0 |
| Ceanothus x | delilianus | 'Gloire de Versailles' | Ceanothus 'Gloire de Versailles' | Veturgrønur runnur. Bláar ella purpurlittar blómur. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og góða, vælavveitta, kálkríka mold. Ikki royndur áður. 'Amerikansk syren.' | 0 |
| Ceratostigma | willmottianum | | Ceratostigma | Lágur leyvfellandi runnur. Bláar blómur, ið standa leingi. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini. Ikki royndur áður. Úr Vesturkina. | 0 |
| Cercidiphyllum | japonicum | | Katsuratræ | Lítið leyvfellandi træ. Ógvuliga litfagran heystarlit. Tykist kunna klára seg nøkulunda í allarbestu gróðrarlíkindum hjá okkum. Lítið roynt áður. Úr Japan. | -1 |
| Chaenomeles | japonica | | Japanskveda | Lágvaksin leyvfellandi runnur. Greinarnar tættar og tornavaksnar. Reyðar blómur, ið ofta eru heldur goymdar millum bløðini. Tørvar tey | 1 |



© Umhvørvisstovan - Endurskoðað útgáva juli 2011 

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | bestu vakstrarlíkindini, t.e. góðan sólargang, góða lívd og góða jørð. Blómar í Føroyum, men setur ikki frukt. Úr Japan. | |
| Chaenomeles x | superba | 'Pink Lady' | Kveda 'Pink Lady' | Lágvaksin, tættvaksin, leyvfellandi runnur. Ljósareyðar blómur. Tørvar tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góðan sólargang, góða lívd og góða jørð. Slagið er blendingur millum *C. japonica* og *C. speciosa*. | 1 |
| Chamaecyparis | lawsoniana | | Lawson-sypris | Miðalstórt tættvaksið nálatræ. Toppskotið lútar. Bleytar greinar og nálir. Hóskilig sum staktræ ella sum girðing. Tolir væl at verða tilskorið. Trívst, har ið ikki er ov ábært. Trívst best í gloprutari, moldríkari jørð. Úr Útnyrðingsnorðuramerika. | 2 |
| Chamaecyparis | lawsoniana | 'Alumii' | Lawson-sypris 'Alumii' | Miðalstórt tættvaksið nálatræ. Bleytar greinar og nálir. Hóskar væl sum staktræ ella sum girðing. Tolir væl at verða tilskorið. Trívst, har ið ikki er ov ábært. Trívst best í gloprutari, moldríkari jørð. | 1 |
| Chamaecyparis | lawsoniana | 'Columnaris' | Lawson-sypris 'Columnaris' | Miðalstórt tættvaksið nálatræ. Bleytar greinar og nálir. Hóskar væl sum staktræ ella sum girðing. Tolir væl at verða tilskorið. Trívst, har ið ikki er ov ábært. Trívst best í gloprutari, moldríkari jørð. | 1 |
| Chamaecyparis | lawsoniana | 'Yvonne' | Lawson-sypris 'Yvonne' | Miðalstórt tættvaksið nálatræ. Bleytar greinar og nálir. Hóskar væl sum staktræ ella sum girðing. Tolir væl at verða tilskorið. Trívst, har ið ikki er ov ábært. Trívst best í gloprutari, moldríkari jørð. | 1 |
| Chamaecyparis | lawsoniana | 'Green Pillar' | Lawsons-sypris 'Green Pillar' | Lágvaksið nálatræ við tættvaksnari krúnu og upprendum vakstrarlagi. Bleytar greinar og nálir. Bjartgrønt dæmi. Hóskar væl sum størri girðing. Tolir væl at verða tilskorið. Trívst, har ið ikki er ov ábært. Trívst best í gloprutari, moldríkari jørð. | 1 |
| Chamaecyparis | lawsoniana | 'Kilmacurragh' | Lawsons-sypris 'Kilmacurragh' | Lágvaksið ella miðalstórt nálatræ við tættvaksnari krúnu. Bleytar greinar og nálir. Bjartgrønt dæmi. Hóskar væl sum staktræ ella sum størri girðing. Tolir væl at verða tilskorið. Trívst, har ið ikki er ov ábært. Trívst best í gloprutari, moldríkari jørð. | 1 |
| Chamaecyparis | lawsoniana | 'Minima' | Lawsons-sypris 'Minima' | Dvørgvaksin veturgrønur runnur/nálatræ við kúluskapi. Bleytar greinar og nálir. Blágrønt dæmi. Hóskar væl til steinbeð og á leiði. Tolir væl at verða tilskorin. Trívst, har ið ikki er ov ábært. Trívst best í gloprutari, moldríkari jørð. | 2 |
| Chamaecyparis | nootkatensis | 'Aurea' | Nootkasypris 'Aurea' | Miðalstórt veturgrønt nálatræ. Toppskotið lútar. Bleytar greinar og nálir. Hóskar væl sum staktræ ella sum girðing. Tolir væl at verða tilskorið. Trívst, har ið ikki er ov ábært. Trívst best í gloprutari, moldríkari jørð. Hetta avbrigdi hevur gulligar nálir. Úr Útnyrðingsnorðuramerika. | 1 |
| Chiliotrichum | diffusum | | Summardáarunnur | Veturgrønur, miðalhøgur, harðførur runnur. Blómurnar meinlíkar summardáum. Tættvaksin, um hann verður kliptur. Eingi stórvegis krøv til jørðildið, tørvar nógv ljós. Natúrlig útbreiðsla: Suðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Eldlandinum. | 3 |
| Clematis | | 'Dr. Ruppel' | Klematis 'Dr. Ruppel' | Klivplanta. Leyvfellandi. Blómurnar stórar, ljósareyðar við myrkum strípum. Fyrstu blómurnar á sumrinum ofta hálvfyltar. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 0 |
| Clematis | | 'Nelly Moser' | Klematis 'Nelly Moser' | Klivplanta. Leyvfellandi. Blómurnar stórar, bleikt ljósareyðar, blikna út á summarið. Tíðliga blómandi. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd og moldríka jørð. | 0 |
| Clematis | | 'Rouge Cardinal' | Klematis 'Rouge Cardinal' | Klivplanta. Leyvfellandi. Blómurnar stórar, fagurreyðar og floyalskendar, blikna út á summarið. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 0 |
| Clematis | macropetala | | Stórblómað Klematis | Klivplanta. Leyvfellandi. Blómurnar stórar, blálittar ella heldur ljósareyðar. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 2 |
| Clematis | montana | | Fjallaklematis | Klivplanta. Leyvfellandi. Blómurnar hvítar. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. Úr Himaleia. | 1 |
| Clematis | montana | 'Freda' | Klematis 'Freda' | Klivplanta. Leyvfellandi. Blómurnar ljósareyðar. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 2 |
| Clematis | montana | 'Tetrarose' | Klematis 'Tetrarose' | Klivplanta. Leyvfellandi. Bløðini bronsulitt. Blómurnar stórar, reyðbláar. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 2 |
| Clematis | montana | 'Rubens' | Klematis 'Rubens' | Klivplanta. Leyvfellandi. Bløðini hava ein farra av bronsuliti. Blómurnar stórar, bleikt reyðar ella ljósareyðar. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 2 |
| Clematis | tangutica | | Klematis | Klivplanta. Leyvfellandi. Bløðini sjógrønan lit. Blómurnar gular, blómar leingi út á heystið. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. Úr Miðasia. | 1 |
| Clethra | alnifolia | 'Clea' | Konvallrunnur 'Clea' | Lágvaksin leyvfellandi runnur. Hvítar, angandi blómur, ið minna um angan av Liljukonvall, harav navnið. Natúrlig útbreiðsla: | 0 |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | Landnyrðingsnorðuramerika. Okkara tilfar: Danmark. Lítið royndur áður. | |
| Corylus | avellana | | Heslirunnur | Miðalhøgur, breiðvaksin, leyvfellandi runnur. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. Heslinøtir (hasselnøtir) eru av hesum runninum. Hevur vaksið í Føroyum til í landnámstíðini. Úr Norðurevropa. | 1 |
| Corylus | avellana | 'Contorta' | Heslirunnur 'Contorta' | Leyvfellandi hávaksin runnur. Greinarnar kurlutar. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 1 |
| Corylus | maxima | 'Purpurea' | Heslirunnur 'Purpurea' | Leyvfellandi hávaksin runnur. Bløðini dimmreyð. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 0 |
| Cotoneaster | | 'Rothschildianus' | Kotoneaster 'Rothschildianus' | Miðalhøgur, breiðvaksin, nærum veturgrønur runnur. Stórar hópar av rómalittum ella gulum blómum. Eingi stórvegis krøv til jørðildið. | 0 |
| Cotoneaster | adpressus | 'Praecox' | Kotoneaster 'Praecox' | Krúpandi, breið- og tættvaksin, leyvfellandi runnur. Smá bløð, nógvar stórar brandgular fruktir. Harðførur, góður til steinbeð. Eisini nevndur 'Nan-shan'. Úr Vesturkina. | 2 |
| Cotoneaster | bullatus | | Bálukotoneaster | Hávaksin leyvfellandi runnur. Bløðini týðiliga bylgjut, fagurlitt um heystið. Bjartreyðar fruktir. Harðførur, eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sólargang. Hóskar væl sum girðing. Natúrlig útbreiðsla: Vesturkina. Okkara tilfar: úr Danmark. | 3 |
| Cotoneaster | conspicuus | 'Decorus' | Kotoneaster 'Decorus' | Lágvaksin veturgrønur runnur. Hóskar væl sum tættur undirvøkstur. Smá bløð, blómurnar tvílittar, reyðar og hvítar. Bjartreyðar fruktir allan veturin. Harðførur. Úr Tibet. | 2 |
| Cotoneaster | dammeri | 'Coral Beauty' DaFo | Kotoneaster 'Coral Beauty' | Krúpandi, breið- og tættvaksin, veturgrønur runnur. Bløðini dimmgrøn, smá. Blómurnar smáar, hvítar. Nógvar korallreyðar fruktir um heystið. Rættiliga harðførur, smá krøv til jørðildið. Avbrigdið er alið úr *C. dammeri* var. *radicans*. | 2 |
| Cotoneaster | dammeri | 'Rami' Dafo | Kotoneaster 'Rami' | Krúpandi, breið- og tættvaksin, veturgrønur runnur. Smá bløð og nógvar korallreyðar fruktir um heystið. Harðførur, smá krøv til jørðildið. Avbrigdið er alið fram í Danmark úr *C. dammeri* var. *radicans*. | 2 |
| Cotoneaster | dammeri | 'Skogholm' | Kotoneaster 'Skogholm' | Krúpandi, breið- og tættvaksin, veturgrønur runnur. Smá bløð og nógvar korallreyðar fruktir um heystið. Harðførur, smá krøv til jørðildið. Avbrigdið er alið úr *C. dammeri* var. *radicans*. | 3 |
| Cotoneaster | divaricatus | | Spíld kotoneaster | Lágvaksin ella miðalhøgur, leyvfellandi runnur. Reydligar blómur og reyðar fruktir. Bløðini fagurlitt um heystið. Úr Kina. | 3 |
| Cotoneaster | horizontalis | | Flatukotoneaster | Lágvaksin veturgrønur runnur. Hóskar væl sum tættur undirvøkstur. Smá bløð, greinarnar sermerkt 'sildabeinsmynstur'. Blómurnar tvílittar, bjartreyðar fruktir. Bløðini og fruktin fagurlitt um heystið. Harðførur. Úr Vesturkina. | 3 |
| Cotoneaster | lacteus | | Kotoneaster | Miðalhøgur ella hávaksin veturgrønur runnur. Stórar hópar av hvítum blómum, reyðar fruktir, ið verða hangandi til seint um veturin.. Eingi stórvegis krøv til jørðildið. Ikki royndur áður. Úr Kina. | 0 |
| Cotoneaster | lucidus | | Kotoneaster | Miðalhøgur, leyvfellandi runnur við upprendum vakstrarlagi. Reydligt hvítar blómur og svartar fruktir. Úr Sibiria. | 2 |
| Cotoneaster | microphyllus | | Kotoneaster | Krúpandi veturgrønur runnur. Bløðini skyggjandi grøn. Skarlaksreyðar fruktir. Hóskar væl til tættan undirvøkstur ella eftir garðløgum. Sigst vera serliga harðførur. Úr Vesturkina. | 1 |
| Cotoneaster | salicifolius | | Kotoneaster | Hávaksin veturgrønur/lutvís veturgrønur runnur. Prýðiligt vakstrarlag. Ungu skotini loðin. Bløðini váknvaksin, bylgjut. Serliga kendur fyri tær nógvu, bjartreyðu fruktirnar. Úr Vesturkina. | 1 |
| Cotoneaster | simonsii | | Kotoneaster | Miðalhøgur runnur, leyvfellandi/lutvís veturgrønur. Upprent vakstrarlag. Hóskar væl til girðing ella í bólki. Hvítar blómur og skarlaksreyðar fruktir. Ikki harðførur. Úr Assam. | -1 |
| Crataegus | coccinea | | Amerikanskur tyrnirunnur | Leyvfellandi runnur ella lítið træ við tornum. Ljósar blómur, skarlaksreyðar fruktir. Ikki royndur áður. Úr Landnyrðingsnorðuramerika. | 0 |
| Crataegus | monogyna | | Einteinaður tyrnirunnur | Leyvfellandi træ ella runnur við tornum. Hvítar, angandi blómur og reyðar fruktir. Tørvar tey bestu vakstrarlíkindini. Einki er frætt um bløming her á landi. Úr Norðurevropa. | 1 |
| Cryptomeria | japonica | | Kryptomeria | Lítið, veturgrønt nálatræ. Hjá okkum tó helst bert ein hávaksin runnur. Tørvar tey bestu vakstrarlíkindini. Er tjóðartræ í Japan, Sugi, og er nógv plantað við átrúnaðarlig merkisstøð. Úr Japan. | 2 |
| Cupressocyparis | leylandii | | Leyland-sypris | Miðalstórt, tættvaksið, skjótvaksandi nálatræ. Tolir væl at verða klipt til girðing. Trívst hjá okkum í støðum, har ið ikki er ov ábært. Leyland-sypris er ein blendingur millum sløgini *Cupressus macrocarpa x Chamaecyparis nootkatensis.* | 3 |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Cupressocyparis | leylandii | 'Castlewellan' | Leyland-sypris 'Castlewellan' | Miðalstórt, tættvaksið, skjótvaksandi nálatræ. Vakstrarlagið sigst minna um fjaðurham. Tolir væl at verða klipt til girðing. Trívst hjá okkum í støðum, har ið ikki er ov ábært. Leyland-sypris  er ein blendingur millum sløgini *Cupressus macrocarpa x Chamaecyparis nootkatensis.* | 2 |
| Cupressocyparis | leylandii | 'Leighton Green' | Leyland-sypris 'Leighton Green' | Miðalstórt skjótvaksandi nálatræ. Vakstrarlagið er tættvaksið. Trívst hjá okkum í støðum, har ið ikki er ov ábært. Leyland sypris  er ein blendingur millum sløgini *Cupressus macrocarpa x Chamaecyparis nootkatensis.* | 2 |
| Cupressus | macrocarpa | | Monterey sypris | Miðalstórt skjótvaksandi nálatræ. Sigst tola nógv vindslit, men sýnist enn ikki at vera nóg harðført hjá okkum, klárar seg bert á lýggjum støðum. Úr Kalifornia. | 2 |
| Cupressus | macrocarpa | 'Goldcrest' | Monterey sypris 'Goldcrest' | Miðalstórt tættvaksið nálatræ við gulbleikum dæmi. Sigst tola nógv vindslit, men sýnist enn ikki at vera nóg harðført hjá okkum. | 2 |
| Cytisus | purpureus | | Purpurgývil | Leyvfellandi lágvaksin runnur. Hóskar væl sum botnvøkstur ella í steinbeði. Bleikt reyðar blómur um várið. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Lítið royndur áður. | 0 |
| Cytisus | scoparius | | Kveistursgývil | Lágur runnur. Stórar gular blómur. Trívst best í turrari, lættari jørð og nógvum ljósi. Blómingin verður best, um runnurin verður tilskorin árliga. Tilfarið hjá okkum er av villum uppruna. Úr Skotlandi. | 2 |
| Cytisus x | | 'Boskoop Ruby' | Várgývil 'Boskoop Ruby' | Veturgrønur ella hálvavegna veturgrønur, miðalhøgur runnur. Bogavaksnar greinar, og handdeild ljósagrøn bløð. Rubinreyðar blómur um várið. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. | 2 |
| Cytisus x | praecox | 'Allgold' | Várgývil 'Allgold' | Lágur runnur. Fjøld av dimmgulum blómum um várið, ið standa leingi. Trívst best í turrari, lættari jørð og nógvum ljósi. Harðførur. | 3 |
| Desfontainia | spinosa | | Desfontainia | Veturgrønur runnur. Vakrar pípuvaksnar reyðar blómur í august-september. Tolir væl skugga. Úr Suðuramerika. | 1 |
| Deutzia x | | 'Mont Rose' | Deutzia 'Mont Rose' | Høgur leyvfellandi runnur við stórum klasum av ljósareyðum blómum uml. miðjan juni. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, góðan sólargang og moldríka jørð. | 2 |
| Diervilla | sessilifolia | 'Dise' Dafo | Diervilla 'Dise' Dafo | Leyvfellandi miðalhøgur runnur. Ungu skotini reydligan lit. Blómurnar gular, seint á sumri. Kann nýtast sum runnagirðing, samanplanting ella undir trøum. Eingi serlig krøv til jørðildið. Lítið royndur áður. | 1 |
| Discaria | toumatou | | Diskaria | Lágur ella miðalhøgur, leyvfellandi runnur, sermerktur av teimum longu tornunum. Blómurnar hvítar við einum grønligum farra. Trívst best í turrari, lættari mold og nógvum ljósi. Lítið royndur áður. Úr Nýsælandi. | 1 |
| Drimys | lanceolata | | Tasmanskur piparrunnur | Lágvaksin veturgrønur runnur. Bløðini blágrøn angandi og við romum piparsmakki. Ungu skotin sermerkt við sínum skyggandi reydliga dæmi. Krevur tey bestu líkindini, t.e. lívd, góða mold og nógv ljós, skal hann trívast hjá okkum. Í heimlandinum hava fruktirnar verið nýttar til piparkrydd. Úr Tasmania. | 2 |
| Drimys | winteri | | Winter-børkur | Hávaksin veturgrønur runnur við tættvaksnum, upprendum vakstrarlagi. Stór bløð, og gráan børk við ramum anga. Blómurnar smáar, fílabeinshvítar og angandi. Krevur góð vakstrarlíkindi, t.e. lívd og góða mold, men dámar eitt vet av skugga. Úr Eldlandinum. | 3 |
| Drimys | winteri | var. andina | Winter-børkur | Avbrigdið er ein lágvaksin og tættur veturgrønur runnur. Stór bløð, og gráan børk við ramum anga. Blómurnar smáar, fílabeinshvítar og angandi, ofta í stórum tali. Krevur góð vakstrarlíkindi, t.e. lívd og góða mold, men dámar eitt vet av skugga. Úr Andesfjøllum. | 3 |
| Elaeagnus | commutata | | Silvurber | Leyvfellandi runnur. Bløðini silvurgrá. Gular, angandi blómur, grá ber. Kann breiða seg við rótskotum. Trívst best í turrari, lættari mold og nógvum ljósi. Lítið royndur áður. Úr Norðuramerika. | 1 |
| Elaeagnus x | ebbingei | | Silvurber | Hávaksin veturgrønur runnur. Blómurnar hvítar, blóðdropalíkar, anga. Trívist best í gloprutari jørð. Hóskar væl til lívdarál. Lítið royndur áður. | 0 |
| Embothrium | coccineum | | Eldrunnur | Hávaksin runnur ella lítið træ, rímiliga harðførur, veturgrønur/lutvís veturgrønur. Stórar reyðar blómur. Trívst best í turrari, gloprutari mold. Úr Eldlandinum. | 3 |
| Enkianthus | campanulatus | | Enkiantus | Leyvfellandi miðalhøgur runnur við upprendum vakstrarlag. Runnurin er tiltikin bæði fyri vakra bløming um várið og fyri vakran heystarlit. Tørvar góða mójørð og góða lívd. Úr Japan. Lítið royndur áður. | 0 |
| Erica | carnea | 'Isabell' | Vetrarklokkulyngur 'Isabell' | Krúpandi veturgrønur runnur. Hvítar blómur og bjartgrøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Mest kendur fyri bløming um veturin og um várið. Upprunin er úr háfjøllunum í Suðurevropa. | 2 |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Erica | carnea | 'Nathalie' | Vetrarklokkulyngur 'Nathalie' | Krúpandi veturgrønur runnur. Myrkareyðar blómur og myrkagrøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Mest kendur fyri blóming um veturin og um várið. Upprunin er úr háfjøllunum í Suðurevropa. | **2** |
| Erica | carnea | 'Rosalie' | Vetrarklokkulyngur 'Rosalie' | Krúpandi veturgrønur runnur. Ljóst reyðar blómur og bronsulitt/grøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Mest kendur fyri blóming um veturin og um várið. Upprunin er úr háfjøllunum í Suðurevropa. | **2** |
| Erica | carnea | 'Schneekuppe' | Vetrarklokkulyngur 'Schneekuppe' | Krúpandi veturgrønur runnur. Hvítar blómur og bjartgrøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Mest kendur fyri blóming um veturin og um várið. Upprunin er úr háfjøllunum í Suðurevropa. | **2** |
| Erica | carnea | 'Winterfreude' | Vetrarklokkulyngur 'Winterfreude' | Krúpandi veturgrønur runnur. Bjartreyðar blómur og grøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Mest kendur fyri blóming um veturin og um várið. Hetta avbrigdið telist millum tey sløgini, ið blóma fyrst um veturin. Upprunin er úr háfjøllunum í Suðurevropa. | **2** |
| Erica | cinerea | | Klokkulyngur | Krúpandi veturgrønur runnur. Dimmreyðar blómur og dimmgrøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Klokkulyngur er upprunavøkstur í Føroyum. | **3** |
| Erica x | darleyensis | 'White Spring Suprise' | Vetrarklokkulyngur 'White Spring Surprise' | Lágvaksin veturgrønur runnur. Hvítar blómur og grøn bløð. Trívst best í turrari mójørð. Blómingin verður best í góðum sólargangi. Mest kendur fyri blóming um veturin og um várið. Upprunin er úr háfjøllunum í Suðurevropa. | **2** |
| Escallonia | macranta | | Eskallonia | Hávaksin veturgrønur runnur. Rættiliga harðførur. Reydligar blómur, og angandi bløð. Trívst best í góðari, glopprutari jørð. Hóskar væl til lívdarál. Natúrlig útbreiðsla: Kili. Okkara tilfar: uppruni úr Orknoyggjum. | **2** |
| Escallonia | macrantha | 'C.F. Ball' | Eskallonia 'C.F. Ball' | Hávaksin veturgrønur runnur. Rættilga harðførur. Reydligar blómur, og angandi bløð. Avbrigdið hevur heldur størri bløð enn slagið vanliga hevur. Trívst best í góðari, glopprutari jørð. Hóskar væl til lívdarál. | **2** |
| Escallonia | rubra | | Eskallonia | Veturgrønur lágvaksin runnur. Kann gerast munandi størri, fær hann loyvi at klíva eftir einum veggi ella garði, har ið lýtt er. Má standa lýtt og í leysari, sandkendari jørð. Blómurnar ljósareyðar til brandreyðar. Úr Suðuramerika. | **1** |
| Escallonia | virgata | | Eskallonia | Lágvaksin ella miðalhøgur leyvfellandi runnur við hangandi greinbygnaði. Hvítar blómur. Trívst best í góðari mold. Úr Patagonia í Suðuramerika. | **2** |
| Escallonia x | | 'Apple Blossom' | Eskallonia 'Apple Blossom' | Veturgrønur miðalhøgur og tættvaksin runnur. Rættiliga harðførur. Trívst best í glopprutari mold og góðum sólargangi. Smáar, ljósareyðar blómur, ið blikna út á summarið. Myrkagrøn bløð. Eigur at verða skorin niður beint eftir, at blómingin er liðug. Lítið royndur áður. Úr Suðuramerika. | **1** |
| Escallonia x | | 'Donard Seedling' | Eskallonia 'Donard Seedling' | Veturgrønur miðalhøgur runnur. Trívst best í glopprutari mold. Smáar, ljósareyðar blómur, ið blikna út á summarið. Myrkagrøn heldur stórvaksin bløð. Eigur at verða skorin niður beint eftir, at blómingin er liðug. Lítið royndur áður. Úr Suðuramerika. | **1** |
| Euonymus | europaeus | | Snælduviður | Leyvfellandi runnur ella lítið træ. Reyðar fruktir, bløð við bjørtum heystarliti. Klárar seg bert í allarbestum vakstrarlíkindum og í kálkríkari jørð. Eitrandi. Úr Evropa. | **1** |
| Euonymus | europaeus | 'Red Cascade' | Snælduviður 'Red Cascade' | Leyvfellandi runnur ella lítið træ. Reyðar fruktir, bløð við bjartreyðum heystarliti. Klárar seg bert í allarbestum vakstrarlíkindum. Eitrandi. Úr Evropa. | **1** |
| Euonymus | fortunei | 'Emerald Gaiety' | Snælduviður 'Emerald Gaiety' | Tættvaksin veturgrønur runnur við litbroyttum bløðum. Tørvar bestu vakstrarlíkindini. Kann verða nýttur sum lág runnagirðing. Eitrandi. Lítið royndur áður. | **0** |
| Euonymus | fortunei | 'Emerald Gold' | Snælduviður 'Emerald Gold' | Lágvaksin veturgrønur runnur við litbroyttum bløðum. Tørvar bestu vakstrarlíkindini. Kann verða nýttur sum lág runnagirðing. Eitrandi. Lítið royndur áður. | **0** |
| Euonymus | fortunei | 'Nyrans' DaFo | Snælduviður 'Nyrans' DaFo | Krúpandi veturgrønur runnur. Vakstrarlagið fær eftir hondini túgvuskap. Hóskar væl til botnvøkstur. Eitrandi. Lítið royndur áður. Úr Asiu. | **0** |
| Fagus | sylvatica | | Bók | Stórvaksið leyvfellandi træ (verður bert miðalstórt í Føroyum). Trívst ikki væl her og krevur tí tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd og góða, kálkríka mold. Ung trø hava vakurt rustreytt leyv um veturin. Eisini nýtuligt til klipta girðing. Úr Danmark. | **2** |
| Fagus | sylvatica | 'Atropunicea' | Reyðbók 'Atropunicea' | Stórvaksið leyvfellandi træ (verður bert miðalstórt í Føroyum). Dimmreyð bløð. Trívst ikki væl her, og krevur tí tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd og góða, kálkríka mold. Mest nýtt sum staktræ. Avbrigdið er klonur úr forminum purpurea. Úr Danmark. | **2** |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Fagus | sylvatica | 'Atropurpurea' | Reyðbók 'Atropurpurea' | Stórvaksið leyvfellandi træ (verður bert miðalstórt í Føroyum). Dimmreyð bløð. Trívst ikki væl her, og krevur tí tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd og góða, kálkríka mold. Mest nýtt sum staktræ. Avbrigdið er stórvaksin klonur. Úr Danmark. | 2 |
| Fallopia | baldschuanica | | "Arkitektens trøst" | Klivplanta. Bløðini ofta hjartavaksin, bleikgrøn. Blómurnar fyrst ljósar, síðan reydligar, fruktin svørt. Krevur tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða mold, lívd og góðan sólargang. Úr Tadsjikistan. | 2 |
| Fargesia | murielae | | Kinabambus | Tættvaksið kjarr, oftast at kalla veturgrønt. Kann verða upp í uml. 2-3 m høgt í góðum vakstrarlíkindum. Trívst best í góðari mold, góðari lívd og góðum sólargangi. Grasaslag. Úr Kina. | 2 |
| Frangula | alnus | | Trøllahegg | Leyvfellandi lítil runnur. Blankt grøn bløð; fruktin fyrst reydligt, seinni svart ber. Tolin fyri vátari, mókendari jørð. Lítið prýðisvirði. Lítið roynd áður. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. Okkara tilfar: úr Danmark. | 0 |
| Fraxinus | excelsior | | Ask | Stórvaksið kravmikið leyvtræ. Trívst ikki væl her, og krevur tí tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. lívd og góða, djúpa moldríka jørð. Træið YGDRASIL úr nørrønu gudalæruni var ein ask. Úr Norðurevropa. | 2 |
| Fuchsia | magellanica | | Blóðdropi | Hávaksin leyvfellandi runnur. Harðførur og kravlítil til jørðildið, tolir væl skugga. Stórar, tvílittar reyðar og bláar blómur frá ólavsøkuleitinum og alt heystið. Ofta búnast fruktin eisini. Kann nýtast bæði sum stakrunnur, runnagirðing og klivplanta. Tolir væl at verða kliptur. Natúrlig útbreiðsla: Suðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Patagonia. | 3 |
| Fuchsia | magellanica | 'Alba' | Blóðdropi 'Alba' | Hávaksin leyvfellandi runnur. Hampiliga harðførur og kravlítil til jørðildið, tolir nakað av skugga. Stórar bleikt reyðar ella ljósar blómur frá ólavsøkuleitinum og alt heystið. Kann nýtast bæði sum stakrunnur, runnagirðing og klivplanta. Skjótvaksandi. Tolir væl at verða kliptur. Natúrlig útbreiðsla: Suðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Danmark. | 2 |
| Fuchsia | magellanica | var. molinae 'Sharpitor' | Blóðdropi 'Sharpitor' | Lágvaksin leyvfellandi runnur við bogavaksnum greinum. Bløðini bleikt randað og grágrøn á liti. Bleikt reyðar blómur í juli. Krevur góða lívd. | 1 |
| Gaultheria | procumbens | | Gaultheria | Krúpandi veturgrønur runnur. Dámar væl mójørð. Fagurlitt leyv og bjartreyðar fruktir um heystið. Hóskar væl sum undirvøkstur. Úr Landnyrðingsnorðuramerika. | 2 |
| Gaultheria | shallon | | Gaultheria | Lágur veturgrønur runnur. Dámar væl mójørð. Stór leðurkend bløð, ljósareyðar blómur, fagurlitt leyv og dimt korkalittar fruktir um heystið. Hóskar væl sum undirvøkstur. Tolir skugga. Úr Útnyrðingsamerika | 3 |
| Gingko | biloba | | Tempultræ | Ógvuliga sermerkt træslag, ið kann lýsast sum eitt leyvfellandi nálatræ, har nálirnar eru bløð. Einasta slag, ið livir eftir av eini plantuætt, ið var vanlig í mongum heimspørtum fyri uml. 160 milliónum árum síðani. Træið hevur átrúnaðarligan týdning í Eysturlondum. Natúrlig útbreiðsla: Kina. Trívst ikki uttandura í Føroyum, men kann verða nýtt í garðsstovum o.tíl. | 1 |
| Griselinia | littoralis | | Griselinia | Hávaksin veturgrønur runnur. Bløðini gulgrøn. Trívst best í moldríkari jørð. Trívst ikki í andgletti, men harafturímóti væl undir einum eystur- ella norðurvendum veggi. Tolir væl saltráma. Hóskar væl til størri stakrunn, ella sum tilskorin girðing. Kall- og kvennplantur hvør sær. Kann fáa skaða í nógvum vetrarkulda.  Úr Nýsælandi. | 3 |
| Hamamelis | intermedia | 'Pallida' | Trøllanøt 'Pallida' | Leyvfellandi runnur. Blómar á berum greinum tíðliga á vári við mongd av brandgulum og vælangandi blómum. Leyvið fær brandgulan til reyðan heystarlit. Trívst bert í teimum bestu vakstrarlíkindunum; í góðari lívd og í góðari mold. Lítið roynd áður. | 0 |
| Hebe | | 'Green Spire' | Heba 'Green Spire' | Krúpandi tættvaksin veturgrønur runnur. Flatvaksnan greinbygnað. Bløðini dimmgrønan lit. Hóskar væl sum steinbeðsrunnur. Úr Nýsælandi. | 2 |
| Hebe | | 'Bowles's Hybrid' | Heba 'Bowles's Hybrid' | Veturgrønur, heldur lágvaksin runnur við ljóst grønum bløðum. Blómurnar fyrst reyðlittar, síðani hvítar. Lin tilskering beint eftir blómingina, heldur runnin tættan. Úr Nýsælandi. | 2 |
| Hebe | | 'Lindsayi' | Heba 'Lindsayi' | Lágvaksin veturgrønur runnur. Upprent vakstrarlag. Blómurnar bleikt ljósareyðar. Lítið roynd áður. Úr Nýsælandi. | 2 |
| Hebe | | 'Youngii' | Heba 'Youngii' | Lágur veturgrønur runnur. Heldur liggjandi vakstrarlag. Blómurnar tvílittar, ljósar og violbláar. Hóskar væl sum steinbeðsrunnur ella kantvøkstur. Nærum sama slagið sum 'Carl Teschner'. Lítið roynd áður. Úr Nýsælandi. | 1 |
| Hebe | albicans | | Heba | Lágur veturgrønur runnur. Hvítar blómur. Harðførur. Úr Nýsælandi. | 2 |
| Hebe | albicans | 'Red Edge' | Heba 'Red Edge' | Lágur veturgrønur runnur. Grágrøn bløð, ið eru reyðrandað um várið. Reyðbláar ella korkalittar blómur, ið seinni blikna. Trívst best í góðari, turrari mold. Úr Nýsælandi. | 2 |
| Hebe | brachysiphon | | Heba | Miðalhøgur veturgrønur runnur. Hvítar blómur í stórum klasum. Úr Nýsælandi. | 1 |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

© Umhvørvisstovan  -  Endurskoðað útgáva juli 2011

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Hebe | buchananii | | Heba | Krúpandi tættvaksin veturgrønur runnur. Greinarnar hava tvey røð av dúni. Smáar, hvítar blómur. Hóskar væl sum steinbeðsrunnur. Úr Nýsælandi. | **2** |
| Hebe | carnosula | | Heba | Heilt lágvaksin veturgrønur runnur við breidligum vakstrarlagi. Smá grágrøn bløð, hvítar blómur úr reydligum blómuknubba. Hóskar væl sum undirvøkstur, kantvøkstur ella sum steinbeðsrunnur. Úr Nýsælandi. | **3** |
| Hebe | chathamica | | Heba | Krúpandi veturgrønur runnur við breidligum vakstrarlagi. Smá bløð og kubbutar, hvítar blómur. Hóskar væl at vaksa niður eftir veggi ella kanti, og sum steinbeðsrunnur. Úr Nýsælandi. | **2** |
| Hebe | cockayniana | | Heba | Lágur, tættvaksin, veturgrønur runnur. Nógvar hvítar blómur tíðliga á sumrinum. Rímiliga harðførur. Úr Nýsælandi. Okkara tilfar: innsavning hjá Nordisk Arboretudvalg (NAU). | **3** |
| Hebe | cupressoides | | Heba | Miðalhøgur, tættvaksin, veturgrønur runnur. Sermerkta útsjónd av teimum smáu bløðunum. Blómar sjáldan líka væl sum aðrir Heburunnar. Blómurnar bleikt bláar/korkalittar. Úr Nýsælandi. | **3** |
| Hebe | elliptica | | Heba | Miðalhøgur veturgrønur runnur. Ljósagrøn bløð. Hvítar til bláligar blómur, stórar, ið anga. Úr Nýsælandi. Okkara tilfar: innsavning hjá Nordisk Arboretudvalg (NAU). | **1** |
| Hebe | evenosa | | Heba | Hávaksin veturgrønur runnur. Hvítar blómur. Úr Nýsælandi. Okkara tilfar: innsavning hjá Nordisk Arboretudvalg (NAU). | **1** |
| Hebe | hectorii | | Heba | Heilt lágur veturgrønur runnur við tøttum, reystvaksnum greinum og heilt smáum, fluskendum bløðum. Blómurnar hvítar ella bleikt ljósareyðar. Harðførur. Úr Nýsælandi. Okkara tilfar: innsavning hjá Nordisk Arboretudvalg (NAU). | **3** |
| Hebe | macrantha | | Heba | Lágur veturgrønur runnur við hyldligum, snøggum, bjartgrønum bløðum. Blómurnar hvítar, av teim størstu millum Heburnar. Harðførur. Lítið royndur áður. Úr Nýsælandi. | **2** |
| Hebe | matthewsii | | Heba | Miðalhøgur veturgrønur runnur. Ungu skotini oftast korkalitt. Bløðini tættvaksin og leðurkend. Blómurnar hvítar ella purpurlittar. Úr Nýsælandi. | **1** |
| Hebe | ochracea | 'James Stirling' | Heba 'James Stirling' | Krúpandi, tættvaksin, veturgrønur runnur. Greinarnar hava sermerktan reyðbrúnan lit, ið sæst serliga væl um veturin. Smá, tættvaksin bløð, smáar, hvítar blómur. Hóskar væl sum steinbeðsrunnur. | **3** |
Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Rhododendron | | 'Grandiflorum' | Rododendron 'Grandiflorum' | Hávaksin veturgrønur runnur. Viólbláar blómur. Trívst best í mójørð og í góðari lívd. Eitt hitt mest roynda slagið av Rododendron í Føroyum. | **2** |
| Rhododendron | | 'Humboldt' | Rododendron 'Humboldt' | Hávaksin veturgrønur runnur. Veikt viólbláar blómur við reyðbrúnum bletti. Trívst best í mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. | **1** |
| Rhododendron | | 'Margaret' | Rododendron 'Margaret' | Hávaksin veturgrønur runnur. Ljóst reydligar blómur. Trívst best í mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. | **0** |
| Rhododendron | | 'Patty Bee' | Rododendron 'Patty Bee' | Lágvaksin veturgrønur runnur. Blómurnar gular. Trívst best í mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. | **0** |
| Rhododendron | | 'Percy Wiseman' | Rododendron 'Percy Wiseman' | Lágvaksin veturgrønur runnur. Ferskugular blómur. Trívst best í mójørð og góðari lívd. Yakushimanum-blendingur. | **2** |
| Rhododendron | | 'Pink Pearl' | Rododendron 'Pink Pearl' | Hávaksin veturgrønur runnur við stórum bløðum. Nógvar blómur saman í tyssi, fyrst ljósareyðar síðan reyðbláar og at enda bleikt hvítar um rendurnar við reyðbrúnum blettum. Trívst best í mójørð, góðari lívd og góðum sólargangi. Lítið royndur áður. | **0** |
| Rhododendron | | 'Princess Anne' | Rododendron 'Princess Anne' | Heilt lágvaksin veturgrønur runnur. Bløðini ljóst grøn á sumri og bronsulitt út á heystið. Ljóst grøngular blómur, ið halda sær væl. Trívst best í mójørð, góðari lívd og góðum sólargangi. | **2** |
| Rhododendron | | 'Ramapo' | Rododendron 'Ramapo' | Heilt lágur veturgrønur runnur. Smá bløð. Viólbláar blómur. Trívst best í mójørð. | **2** |
| Rhododendron | | 'Roseum Elegans' | Rododendron 'Roseum Elegans' | Hávaksin veturgrønur runnur við stórum olivingrønum bløðum. Reyðbláar/ljósareyðar blómur. Trívst best í mójørð, góðari lívd og góðum sólargangi. | **0** |
| Rhododendron | | 'Scarlet Wonder' | Rododendron 'Scarlet Wonder' | Lágvaksin veturgrønur runnur. Reyðar blómur. Trívst best í mójørð og góðari lívd. | **1** |
| Rhododendron | | 'Taurus' | Rododendron 'Taurus' | Hávaksin veturgrønur runnur við breiðvaksnum vakstrarlagi. Reyðar blaðknubbar/vetrarknubbar. Stórvaksin, leðurkend dimmgrøn bløð. Blómurnar klokkudánaðar; brandreyðar við dimmreyðum blettum. Veksur best í mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. | **1** |
| Rhododendron | fortunei | | Rododendron | Hávaksin veturgrønur runnur, ella lítið træ, við upprendum vakstrarlagi. Skot og blaðstelkar hava viólbláan lit. Stórvaksin, grøn bløð. Blómurnar traktdánaðar; liturin er broytiligur millum bleikt lavendelblátt, bleikt reytt ella hvítt við einum reydligum farra. Blómurnar anga. Veksur best í mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. Úr Kina. | **0** |
| Rhododendron | rubiginosum | | Rododendron | Hávaksin veturgrønur runnur. Stórvaksin bløð, ið hava reyðbrúnt skrubb á ranguni. Blómurnar traktdánaðar; ljósareyðar ella purpurlittar. Trívst best í gloprutari mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. | **0** |
| Rhododendron | williamsianum | 'Gartendir. Glocker' | Rododendron 'Gartendir. Glocker' | Lágvaksin runnur. Vínreyðar ella myrkareyðar blómur. Trívst best í mójørð og góðari lívd. | **3** |
| Rhododendron | williamsianum | 'Gartendir. Rieger' | Rododendron 'Gartendir. Rieger' | Lágvaksin runnur. Hvítar ella rómalittar blómur. Trívst best í mójørð og góðari lívd. | **3** |
| Rhododendron | yakushimanum | 'Fantastica' | Rododendron 'Fantastica' | Miðalstórur veturgrønur runnur. Stór bløð, ið eru loðin á ranguni. Ljósareyðar blómur. Trívst best í mójørð og góðari lívd. | **2** |
| Rhododendron | yakushimanum | 'Kochiro Wada' | Rododendron 'Kochiro Wada' | Miðalstórur ella lágvaksin, veturgrønur runnur. Heldur stór langleitt bløð, ið eru loðin á ranguni. Hvítar ella bleikreyðar blómur, knubbarnir bjartreyðir. Trívst best í mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. | **1** |
| Rhododendron | yakushimanum | 'Schneekrone' | Rododendron 'Schneekrone' | Miðalstórur ella lágvaksin og tættur, veturgrønur runnur. Bløðini nærum blágrøn á liti. Hvítar blómur. Trívst best í mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. | **1** |
| Rhododendron x | rex | ‘Great Dane’ | Rododendron ‘Great Dane’ | Miðalhøgur veturgrønur runnur. Stórvaksin grágrøn bløð. Blómurnar hvítar við myrkt purpurlittum gómabletti. Trívst best í mójørð og góðari lívd. Lítið royndur áður. | **0** |
| Ribes | alpinum | | Fjallaribes | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Tunnar greinar og hangandi vøkstur. Gulgrønar blómur. Harðførur. Tolir serliga væl skugga. Tolir væl at verða kliptur. Natúrlig útbreiðsla: Norðurevropa. Okkara tilfar: úr Danmark. | **3** |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Ribes | alpinum | 'Dima' ♀ DaFc | Fjallaribes 'Dima' ♀ | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Tunnar greinar og hangandi vøkstur. Gulgrønar blómur. Harðførur. Tolir serliga væl skugga. Tolir væl at verða kliptur. Natúrlig útbreiðsla: Norðurevropa. Okkara tilfar: avbrigdið er kvennplanta, alin fram í Danmark. | 3 |
| Ribes | alpinum | 'Hemus' ♂ Dal | Fjallaribes 'Hemus' ♂ DaFo | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Tunnar greinar og hangandi vøkstur. Gulgrønar blómur. Harðførur. Tolir serliga væl skugga. Tolir væl at verða kliptur. Natúrlig útbreiðsla: Norðurevropa. Okkara tilfar: avbrigdið er kallplanta, alin fram í Danmark. | 3 |
| Ribes | bracteosum | | Kalifornisk sólber | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Upprent, glóprut vakstrarlag. Harðførur og kravlítil til jørðildið, trívst m.a. væl í mójørð. Tolir sjáldsama væl skugga. Blómurnar grøngular, í longum klasum. Raman anga. Fruktin er svørt ber, ið eru góð at eta. Úr Alaska. | 3 |
| Ribes | laxiflorum | | Krúpandi alaskaribsber | Leyvfellandi klivrunnur. Bløðini bjartgrøn um várið, seinni myrkari. Blómurnar fagurreyðar. Blómar tíðliga á vári. Trívst best í góðari jørð. Tolir væl av skugga. Natúrlig útbreiðsla: Útnyrðingsamerika. Okkara tilfar: úr Alaska. | 3 |
| Ribes | nigrum | | Sólber | Miðalhøgur leyvfellandi berjarunnur. Upprent vakstrarlag. Trívst væl í Føroyum. Setur væl av berjum, ið búnast hampiliga tíðliga. Trívst best í góðari jørð. Harðførur. Eigur at tilskerast tíðum. Kann verða skaddur av mjøldøggsoppi. | 3 |
| Ribes | nigrum | 'Ben Lomond' DaFo | Sólber 'Ben Lomond' DaFo | Miðalhøgur leyvfellandi, berjarunnur. Upprent vakstrarlag. Trívst væl í Føroyum. Setur væl av berjum, ið búnast hampiliga tíðliga. Trívst best í góðari jørð. Harðførur. Eigur at tilskerast tíðum. Kann verða skaddur av mjøldøggsoppi. Slagið stavar úr Skotlandi. | 3 |
| Ribes | nigrum | 'Øjebyn' | Sólber 'Øjebyn' | Miðalhøgur leyvfellandi, berjarunnur, ið trívst væl í Føroyum. Setur væl av berjum, helst í góðari jørð. Harðførur. Eigur at tilskerast tíðum. Slagið er eitt tað mest mótstøðuføra móti mjøldøggsoppi. | 3 |
| Ribes | nigrum | 'Titania' | Sólber 'Titania' | Miðalhøgur leyvfellandi berjarunnur. Upprent vakstrarlag. Setur væl av stórum berjum í longum klasum, ið búnast hampiliga tíðliga. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Eigur at tilskerast tíðum. Sigst vera rættiliga mótstøðuførur móti mjøldøggsoppi og rustsoppi. Stavar úr Niðurlondum. | 2 |
| Ribes | nigrum x uva-crispa | | Jostaber | Hávaksin leyvfellandi berjarunnur. Blendingur millum Sólber og Stikkulsber. Upprent vakstrarlag. Bløðini grøn. Fruktin svørt, stór ber. Góð matfrukt. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Eigur at tilskerast tíðum. | 2 |
| Ribes | odoratum | | Sóljugul blómuribes | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Upprent vakstrarlag, men ytru greinarnar kunnu fáa bogadánað vakstrarlag. Bløðini ljósagrøn. Blómar tíðliga á vári. Blómurnar sóljugular, í longum klasum, anga óført. Fruktin er svørt ber. Lítið royndur áður. Úr Norðuramerika. Slagið verður ofta mistikið fyri *Ribes aureum*. | 0 |
| Ribes | rubrum | ‘Rondom’ | Ribsber ‘Rondom’ | Lágur, tættvaksin, leyvfellandi berjarunnur. Setur væl av myrkareyðum berjum, ið búnast seint. Trívst best í góðari jørð. Eigur at tilskerast tíðum. Stavar úr Niðurlondum. | 2 |
| Ribes | rubrum | 'Laxton' | Ribsber 'Laxton' | Miðalhøgur leyvfellandi berjarunnur, ið trívst væl í Føroyum. Setur væl av berjum, helst í góðari jørð. Harðførur. Eigur at tilskerast tíðum. | 3 |
| Ribes | rubrum | 'Rondom' DaFo | Ribsber 'Rondom' DaFo | Lágur, tættvaksin, leyvfellandi berjarunnur. Setur væl av myrkareyðum berjum, ið búnast seint. Trívst best í góðari jørð. Eigur at tilskerast tíðum. Slagið er lítið roynt áður. Stavar úr Niðurlondum. | 3 |
| Ribes | rubrum | 'Stanza' DaFo | Ribsber 'Stanza' DaFo | Miðalvaksin leyvfellandi berjarunnur. Upprent vakstrarlag. Setur væl av myrkareyðum berjum í longum klasum, ið búnast tíðliga. Trívst best í góðari jørð. Eigur at tilskerast tíðum. Slagið er lítið roynt áður. Sigst vera rættiliga mótstøðuført móti mjøldøggsoppi. Stavar úr Niðurlondum. | 3 |
| Ribes | sanguineum | | Ljósareyð blómuribes | Høgur, breiðvaksin, leyvfellandi runnur. Blómar tíðliga á vári. Blómurnar ljósareyðar. Mest nýtti runnur í Føroyum til girðing. Harðførur. Hetta er villa slagið. Úr Útnyrðingsnorðuramerika. | 3 |
| Ribes | sanguineum | | Myrkareyð blómuribes | Høgur, breiðvaksin, leyvfellandi runnur. Blómar tíðliga á vári. Blómurnar myrkareyðar. Mest nýtti runnur í Føroyum til girðing. Harðførur. Hetta avbrigdið sýnist at vera knapt so harðført sum villa slagið. Villa slagið er ættað úr Útnyrðingsnorðuramerika. | 3 |
| Ribes | sanguineum | 'Koja' | Blómuribes 'Koja' | Miðalhøgur, tættvaksin, leyvfellandi runnur. Blómar tíðliga á vári. Blómurnar myrkareyðar. Mest nýtti runnur í Føroyum til girðing. Harðførur. Myrkt blómandi avbrigdini sýnast at vera knapt so harðfør sum villa slagið. Villa slagið er ættað úr Útnyrðingsnorðuramerika. | 3 |
| Ribes | uva-crispa | ‘Gul Hinnomaki’ | Stikkulsber ‘Gul Hinnomaki’ | Lágur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Setur væl av smáum, gulum, dúnutum berjum, ið búnast hampiliga tíðliga. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Eigur at tilskerast tíðum. Hóskar væl at halda í eini vakstrargrind (espalier). Slagið sigst vera rættiliga mótstøðuført móti mjøldøggsoppinum “stikkulsberjadrepara”. | 2 |
| Ribes | uva-crispa | ‘Rød Hinnomaki’ | Stikkulsber ‘Rød | Lágur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Setur væl av smáum, reyðum berjum, ið búnast tíðliga. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Eigur at tilskerast tíðum. Hóskar væl at halda í eini vakstrargrind (espalier). Slagið sigst vera rættiliga | 2 |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | Hinnomaki’ | mótstøðuført móti mjøldøggsoppinum “stikkulsberjadrepara”. | |
| Ribes | uva-crispa | 'Careless' | Stikkulsber 'Careless' | Lágur leyvfellandi runnur við tornum. Harðførur, trívst væl í Føroyum. Setur væl av gullittum berjum, helst í góðari jørð. Eigur at tilskerast tíðum. | 2 |
| Ribes | uva-crispa | 'Invicta' | Stikkulsber 'Invicta' | Lágur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Setur væl av stórum gulgrønum berjum, ið búnast hampiliga tíðliga. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Eigur at tilskerast tíðum. Hóskar væl at halda í eini vakstrargrind (espalier). Slagið sigst vera tað mest mótstøðuføra móti mjøldøggsoppinum “stikkulsberjadrepara”. | 2 |
| Ribes | uva-crispa | 'Tatjana' | Stikkulsber 'Tatjana' | Lágur leyvfellandi runnur við nærum ongum tornum. Upprent vakstrarlag. Setur væl av stórum, gulum berjum, ið búnast hampiliga tíðliga. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Eigur at tilskerast tíðum. Hóskar væl at halda í eini vakstrargrind (espalier). | 2 |
| Rosa | | ‘Chinatown’ | Rósurunnur ‘Chinatown’ | Miðalhøgur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Bløðini bjartgrøn. Blómurnar gular við einum farra av reyðum, tá ið tær spretta, miðalstórar, dupult fyltar, anga væl. Verður bólkaður sum floribunda/bukettrósurunnur, t.e. við blómum í tyssum. Eisini nýtilig í eini vakstrargrind (espalier) sum klivrósa. Trívst best í góðari, moldríkari jørð, góðum sólargangi og góðari lívd. | 2 |
| Rosa | | ‘Cottage Rose’ | Rósurunnur ‘Cottage Rose’ | Miðalhøgur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Bløðini bjartgrøn, glinsandi. Blómurnar ljósareyðar, miðalstórar, fyltar, anga væl. Afturblómandi (remonterandi) rósurunnur, t.e. ið blómar áhaldandi út á heystið. Trívst best í góðari, moldríkari jørð, góðum sólargangi og góðari lívd. | 1 |
| Rosa | | ‘Westerland’ | Rósurunnur ‘Westerland’ | Miðalhøgur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Bløðini bronsulitt, tá ið tey eru nýsprottin, seinni grøn. Blómurnar brandgular ella gular, hálvfyltar, anga væl. Trívst best í góðari, moldríkari jørð, góðum sólargangi og góðari lívd. | 2 |
| Rosa | | 'The Fairy' | Rósurunnur 'The Fairy' | Lágvaksin runnur við tornum. Bløðini smá og blonk. Blómurnar ljósareyðar, smáar, fyltar, í tyssum. Bólkað sum polyantharósurunnur, t.e. við smærri blómum í tyssum alla vakstrartíðina. Trívst best í góðari, moldríkari jørð, góðum sólargangi og góðari lívd. | 1 |
| Rosa | canina | | Hundarósa | Miðalhøgur til hávaksin, leyvfellandi runnur við tornum. Bløðini eru ofta grágrøn ella blágrøn á rættuni. Blómurnar eru oftast bleikt ljósareyðar ella hvítar, og hjúpan (hyben) er skarlaksreyð. Úr Skotlandi. | 1 |
| Rosa | dumalis | | Blágrøn rósa | Miðalhøgur til hávaksin, leyvfellandi runnur við tornum. Skotini eru reydlig. Bløðini blágrøn og døggkend. Blómurnar ljósareyðar, og hjúpan (hyben) er myrkareyð. Úr Danmark. | 1 |
| Rosa | moyesii | | Moyes-rósa | Hávaksin, hampiliga harðførur, leyvfellandi runnur við tornum. Upprent, ótætt vakstrarlag. Bløðini grøn. Blómurnar blóðreyðar. Kann fáa væl av reyðum hjúpum (hyben) um heystið. Eisini nýtilig í eini vakstrargrind (espalier) sum klivrósa. Trívst best í góðari, moldríkari jørð, góðum sólargangi og góðari lívd. Úr Vesturkina. | 3 |
| Rosa | rugosa | | Brigdurósa | Miðalhøgur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Breiðir seg við rótskotum. Bløðini grøn. Blómurnar purpurreyðar, angandi. Blómar væl. Kann fáa væl av reydligum hjúpum (hyben) um heystið. Ein hin harðførasti runnur í Føroyum. Eigur at tilskerast tíðum. Úr Fjareystri. | 3 |
| Rosa | rugosa | 'Alba' | Hvítblømd brigdurósa | Miðalhøgur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Breiðir seg við rótskotum. Bløðini grøn. Blómurnar hvítar, angandi. Blómar væl. Kann fáa væl av reydligum hjúpum (hyben) um heystið. Ein hin harðførasti runnur í Føroyum. Eigur at tilskerast tíðum. Úr Fjareystri. | 3 |
| Rosa | virginiana | | Glíggjblaðað rósa | Lágur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Blómurnar ljósareyðar ella hvítar. Trívst best í leysari sandkendari jørð. Úr Landnyrðingsnorðuramerika. | 2 |
| Rosa | xanthina | 'Canary Bird' | Rósurunnur 'Canary Bird' | Miðalhøgur, breiðvaksin, leyvfellandi runnur við tornum. Hangandi greinar við smáum, trøllakambakendum bløðum. Blómurnar bleikt gular, einstakar, anga nakað. Várblómandi. Trívst best í góðari, moldríkari jørð, góðum sólargangi og góðari lívd. | 1 |
| Rosa x | pimpinellifolia | ‘Frühlingsduft’ | Rósurunnur ‘Frühlingsduft’ | Hávaksin leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Bløðini bjartgrøn. Blómurnar ljóst gular við einum farra av ljósareyðum, hálvfyltar, anga væl. Eisini nýtiligur í eini vakstrargrind (espalier) sum klivrósa. Trívst best í góðari, moldríkari jørð, góðum sólargangi og góðari lívd. | 0 |
| Rosa x | pimpinellifolia | ‘Maigold’ | Rósurunnur ‘Maigold’ | Hávaksin leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Bløðini dimmgrøn, glinsandi. Blómurnar gular, hálvfyltar, anga væl. Eisini nýtiligur í eini vakstrargrind (espalier) sum klivrósa. Trívst best í góðari, moldríkari jørð, góðum sólargangi og góðari lívd. | 1 |
| Rosa x | rugosa | ‘Fru Dagmar | Rósurunnur ‘Fru Dagmar | Miðalhøgur leyvfellandi runnur við tornum. Kúput vakstrarlag. Bløðini bjartgrøn, glinsandi. Blómurnar ljósareyðar, anga væl. Kann fáa | 3 |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Hastrup' | Hastrup' | væl av reyðum hjúpum (hyben) um heystið. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini. Eigur at tilskerast tíðum. | |
| Rosa x | rugosa | 'Hansaland' | Rósurunnur 'Hansaland' | Miðalhøgur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent, breiðvaksið vakstrarlag. Bløðini dimmgrøn. Blómurnar ljósareyðar, anga. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini. Eigur at tilskerast tíðum. | 2 |
| Rubus | fruticosus | 'Loch Ness' | Bromberjarunnur 'Loch Ness' | Miðalhøgur leyvfellandi berjarunnur. Avbrigdið hevur ársskot og greinar við ongum tornum. Stór, svørt ber seint á sumri. Runnurin er hóskiligur at halda í eini vakstrargrind (espalier). Trívst best í góðari, gloprutari og moldkendari jørð, í góðum sólargangi og í hampiligari lívd. Lítið royndur áður. | 0 |
| Rubus | idaeus | 'Glen Ample' | Hindber 'Glen Ample' | Miðalhøgur leyvfellandi berjarunnur. Trívst best í góðum vakstrarlíkindum, t.e. góðari mold og góðari lívd. Greinarnar eru tornaleysar. Berini eru stórvaksin, og búnast heldur tíðliga. Slagið fær ikki so lætt soppasjúkur. Lítið roynd áður. | 0 |
| Rubus | tricolor | | Rubus | Veturgrønur, breiðvaksin, krúpandi runnur. Hóskar væl til undirvøkstur. Trívst best í góðari mójørð og í lívd. Tolir skugga. Bløðini skyggjandi dimmgrøn, hvítar blómur og bjartreyðar fruktir, ið eru etandi. Úr Vesturkina. | 2 |
| Salix | alaxensis | var. longistylis | Alaskapílur | Høgur, skjótvaksandi, leyvfellandi runnur ella lítið træ. Upprent vakstrarlag. Skotini prúð, snøgg, við døggkendum, bláligum dæmi. Bløðini eggvaksin ella øvut váknvaksin, kámt grøn á rættuni, filtloðin hvít á ranguni. Blómar áður enn bløðini spretta. Blómurnar ("gásarungarnir") ásýniligar, stórar, gulligar. Harðførur. Hóskar væl til runna- ella lívdargirðing. Tolir væl at verða kliptur. Trívst best í góðum sólargangi. Eingi serlig krøv til jørðildið. Natúrlig útbreiðsla: Útnyrðingsnorðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Alaska. | 3 |
| Salix | arctica | | Arktiskur pílur | Lágvaksin leyvfellandi runnur. Harðførur. Hóskar væl til steinbeð ella laðing. Tolir væl at verða kliptur. Ljóskrevjandi. Eingi serlig krøv til jørðildið. Upprunavøkstur í Føroyum. | 3 |
| Salix | aurita | | Oyrnapílur | Miðalhøgur, skjótvaksandi, leyvfellandi runnur. Harðførur, men trívst ikki í skugga. Tolir væl at verða kliptur. Eingi serlig krøv til jørðildið. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. Okkara tilfar: úr Skotlandi. | 2 |
| Salix | caprea | | Seljupílur | Hávaksin leyvfellandi runnur ella træ. Rættliga harðførur. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til lívdargirðing. Eingi serlig krøv til jørðildið, men best í góðari, tøðuríkari mold. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. Okkara tilfar: úr Skotlandi. | 2 |
| Salix | cinerea | | Grápílur | Hávaksin leyvfellandi runnur. Harðførur. Hóskar væl til runna- ella lívdargirðing. Eingi serlig krøv til jørðildið, men trívst best í góðari, tøðuríkari mold. Tolir væl at verða kliptur. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. Okkara tilfar: úr Skotlandi. | 3 |
| Salix | hookeriana | | Skútupílur | Høgur, skjótvaksandi, leyvfellandi runnur ella lítið træ. Upprent vakstrarlag. Skotini prúð, myrkabrún og ógvuliga dúnloðin. Bløðini rundleitt, bleikt grøn á rættuni, hvítleitt á ranguni. Blómar um sama leiti, sum bløðini spretta. Blómurnar ("gásarungarnir") ásýniligar og á longum leggi; stórar, ljósar. Harðførur. Hóskar væl til runna- ella lívdargirðing. Tolir væl at verða kliptur. Trívst best í góðum sólargangi. Eingi serlig krøv til jørðildið. Natúrlig útbreiðsla: Útnyrðingsnorðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Alaska. | 3 |
| Salix | lanata | | Loðpílur | Lágvaksin leyvfellandi runnur. Harðførur. Hóskar væl til steinbeð ella laðing. Tolir væl at verða kliptur. Ljóskrevjandi. Eingi serlig krøv til jørðildið. Upprunavøkstur í Føroyum. | 3 |
| Salix | myrsinites | | Myrtupílur | Krúpandi leyvfellandi runnur. Fjallagróður. Ársskotini skyggandi reyðbrún. Ljóskrevjandi. Trívst væl í kálkríkari jørð. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. | 1 |
| Salix | nigricans | ssp. borealis | Ærgispílur | Høgur, skjótvaksandi, leyvfellandi runnur ella lítið træ. Upprent vakstrarlag. Ársskotini skyggandi reyðbrún. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til runnagirðing. Tolir væl at verða kliptur. Ljóskrevjandi, skal hann vera tættur. Eingi serlig krøv til jørðildið. Natúrlig útbreiðsla: Skandinavia. Okkara tilfar: úr Íslandi. | 1 |
| Salix | pentandra | | Glíggjpílur | Høgur, skjótvaksandi, leyvfellandi runnur ella lítið træ. Upprent vakstrarlag. Ársskotini skyggjandi. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til runnagirðing. Tolir væl at verða kliptur. Ljóskrevjandi, skal hann vera tættur. Trívst best í góðari jørð. Summastaðni nýttur sum tiltak fyri lavrberjabløð. Natúrlig útbreiðsla: Skandinavia. Okkara tilfar: úr Íslandi. | 1 |
| Salix | phylicifolia | | Pálmapílur (Pálmi) | Miðalhøgur ella lágvaksin leyvfellandi runnur. Harðførur. Hóskar væl til girðing, steinbeð ella laðing. Tolir væl at verða kliptur. Ljóskrevjandi, skal hann vera tættur. Eingi serlig krøv til jørðildið. Upprunavøkstur í Føroyum. | 3 |
| Salix | purpurea | 'Gracilis' | Purpurpílur 'Gracilis' | Miðalhøgur ella lágvaksin leyvfellandi runnur. Greinarnar fínliga vaksnar, grágrønar við einum reydligum farra. Bløðini smælvaksin. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini. Hóskar væl til runnagirðing. Greinarnar nýttar til at flætta við. Lítið royndur áður. | 0 |
| Salix | repens | 'Rosmarinifolia' | Krúpandi pílur | Miðalhøgur ella lágvaksin leyvfellandi runnur. Greinarnar bogavaksnar. Bløðini smælvaksin, dimmgrøn. Eingi ávís krøv til | 0 |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | 'Rosmarinifolia' | vakstrarlíkindini. Hóskar væl til runnagirðing og botnvøkstur. Lítið royndur áður. | |
| Salix | repens | 'Sakry' | Krúpandi pílur 'Sakry' | Lágvaksin leyvfellandi runnur. Greinarnar fínliga vaksnar. Bløðini smælvaksin, silvurgrøn. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini. Hóskar væl til botnvøkstur. Lítið royndur áður. | **0** |
| Salix | sp. | | Krúpandi pílur | Krúpandi ella lágvaksin leyvfellandi runnur. Harðførur. Hóskar væl til steinbeð ella t.d. at breiða seg um eitt garðlag. Tolir væl at verða kliptur. Ljóskrevjandi. Veksur best í góðari mold. Blómurnar ("gásarungarnir") sera prýðiligar um várið. Upprunin er ivaleyst ein blendingur millum Loðpíl og onnur føroysk pílasløg. | **3** |
| Salix | viminalis | | Bandpílur | Hávaksin, skjótvaksandi, leyvfellandi runnur ella lítið træ. Upprent vakstrarlag. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til runnagirðing. Tolir væl at verða tilskorin. Ljóskrevjandi, skal hann vera tættur. Seint á sumri og út á heystið bleiktrar leyvið vakurt í lotinum. Trívst best í góðari, tøðuríkari mold. Tunnar greinar nógv nýttar at virka kurvar o.tíl. úr. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. Okkara tilfar: av donskum uppruna. | **2** |
| Salix x | | 'Brekkuviðir' | 'Brekkuviðir' | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Harðførur. Tolir væl at verða kliptur. Hóskar væl til runna- ella lívdargirðing. Ljóskrevjandi, skal hann vera tættur. Eingi serlig krøv til jørðildið. Avbrigdið er blendingur við Pálmapíl. Okkara tilfar: av íslendskum uppruna. | **3** |
| Sambucus | callicarpa | | Alaskahyllirunnur | Hávaksin leyvfellandi runnur. Upprent, opið vakstrarlag. Hvítar blómur og reyð ber. Trívst best í góðari lívd og góðari moldkendari jørð. Tolir væl av skugga. Natúrlig útbreiðsla: Útnyrðingsnorðuramerika. Okkara tilfar: úr Føroyum. | **3** |
| Sambucus | nigra | | Hyllirunnur | Hávaksin, harðførur, leyvfellandi runnur. Tolir væl slitvind. Blómar væl, blómurnar hvítar. Fær vanliga ikki búgvin ber hjá okkum. Trívst best í lættari jørð og góðum sólargangi. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. Okkara tilfar: úr Danmark. | **3** |
| Sambucus | nigra | 'Black Beauty' | Hyllirunnur 'Black Beauty' | Miðalhøgur ella høgur, tættvaksin, leyvfellandi runnur. Bløðini myrkt purpurlitt ella svørt. Blómurnar ljósareyðar. Fruktin svørt ber. Fær vanliga ikki búgvin ber hjá okkum. Trívst best í lættari jørð og góðum sólargangi. Avbrigdið er lítið roynt áður. | 0 |
| Sciadopitys | verticillata | | Sciadopitys | Lítið til miðalstórt, seinvaksandi og ógvuliga sjáldsamt nálatræ úr furuættini. Tolir ikki slitvind. Trívst best í góðari mójørð og uttan kálk. Skínandi grønar nálir, og reyðbrúnan børk. Bretar kalla træið "Umbrella Pine". Lítið roynt hjá okkum. Natúrlig útbreiðsla: Japan. Okkara tilfar: úr Skotlandi. | **0** |
| Skimmia | japonica | | Skimmia | Lágur veturgrønur runnur. Blómar tíðliga. Blómurnar hvítar, angandi. Trívst best í góðari mold. Úr Japan. | **1** |
| Skimmia | japonica | 'Foremanii' ♀ | Skimmia 'Foremanii' ♀ | Lágur veturgrønur runnur. Blómar tíðliga. Blómurnar hvítar, angandi. Trívst best í góðari mold. Kvennplanta. Úr Japan. | **1** |
| Skimmia | japonica | 'Rubella' ♂ | Skimmia 'Rubella' ♂ | Lágur veturgrønur runnur. Blómar tíðliga. Blómurnar hvítar, angandi. Trívst best í góðari mold. Kallplanta. Úr Japan. | **1** |
| Sorbaria | sorbifolia | | Sorbaria | Leyvfellandi miðalhøgur runnur. Upprent vakstrarlag. Hvítar blómur í longum, upprendum toppum. Harðførur. Breiðir seg við rótskotum. Úr Fjareystri. | **2** |
| Sorbaria | sorbifolia | 'Sem' | Sorbaria 'Sem' | Lágur tættvaksin leyvfellandi runnur. Upprent vakstrarlag. Bløðini eru ógvuliga litføgur; reyð litbrigdi, tá ið tey spretta, bleikgrøn litbrigdi um summarið, brandreyð litbrigdi um heystið. Hvítar blómur í longum, upprendum toppum. Harðførur. Breiðir seg við rótskotum. | **2** |
| Sorbus | | 'Dodong' | Ullungroynir 'Dodong' | Leyvfellandi træ. Blonkgrøn bløð, ið fáa sterkan, brandgulan heystarlit. Nógvar hvítar blómur, og tigulreyð, peruvaksin ber um heystið. Tørvar allarbestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, nógva sól og góða moldríka jørð. Slagið er lítið roynt áður hjá okkum. Upprunastaður: oyggin Ullung-do í Suðurkorea. Okkara tilfar: innsavning hjá Nordisk Arboretudvalg (NAU). | **0** |
| Sorbus | | 'Beauty of Banff' | Roynir 'Beauty of Banff' | Miðalstórt leyvfellandi træ. Hvítar blómur. Bløðini fáa sterkan heystarlit. | **1** |
| Sorbus | | 'Josep Rock' | Roynir 'Josep Rock' | Miðalstórt leyvfellandi træ. Upprent vakstrarlag. Hvítar blómur og gulligar fruktir. Bløðini fáa sterkan heystarlit. | **1** |
| Sorbus | | 'Rouge Autumnale' | Roynir, 'Rouge Autumnale' | Miðalstórt leyvfellandi træ. Hvítar blómur. Bløðini fáa sterkan heystarlit. | **1** |
| Sorbus | aucuparia | | Skógarroynir | Lítið leyvfellandi træ. Harðført. Blómar væl. Blómurnar hvítar. Reyð ber um heystið. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. | **3** |
| Sorbus | aucuparia | 'Sheerwater Seedling' | Skógarroynir 'Sheerwater Seedling' | Lítið leyvfellandi træ. Upprent vakstrarlag, men hangandi greinbygnað. Hvítar blómur, og brandreyð ber um heystið. Nógv nýtt sum vegtræ. Úr Skotlandi. | **1** |
| Sorbus | cashmiriana | | Kashmirroynir | Lítið leyvfellandi træ ella hávaksin runnur. Stór samansett bløð. Blómurnar hvítar við einum reydligum farra. Hvít ber, ið hanga leingi á trøunum. Úr Kashmir. | **1** |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

© Umhvørvisstovan - Endurskoðað útgáva juli 2011

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| Sorbus | commixta | | Japansroynir | Lítið leyvfellandi træ. Ungu skotini reydlig. Stór samansett bløð. Bløðini fagurlitt um várið og um heystið. Hvítar blómur og reyð ber. Trívst í góðum vakstrarlíkindum. Úr Japan. | **2** |
| Sorbus | intermedia | | Seljuroynir | Miðalstórt leyvfellandi træ. Dimm, grágrøn bløð, hvítar blómur og brandgul ber. Harðførur. Trívst best í turrlendi. Úr syðra parti av Skandinavia. | **2** |
| Sorbus | koehneana | | Perluroynir | Leyvfellandi runnur ella lítið træ. Hvítar blómur og hvít ber. Tørvar allarbestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd, nógva sól og góða moldríka jørð. Upprunastaður: Kina. Okkara tilfar: Skotland. | **1** |
| Sorbus | meinichii | | Norskur fagurroynir | Lítið leyvfellandi træ. Harðført. Blómar væl. Blómurnar hvítar. Reyð ber um heystið. Natúrlig útbreiðsla: Skandinavia. Okkara tilfar: úr Vesturnoregi. | **2** |
| Sorbus | mougeotii | | Alpuroynir | Miðalstórt leyvfellandi træ. Tætt vakstrarlag. Grágrøn bløð. Nógvar hvítar blómur og reyð ber. Harðførur. Eingi serlig krøv til jørðildið. Líkist nógv Seljuroyni, men er minni av vøkstri, og blómar og fruktar betur. Natúrlig útbreiðsla: vestaru Alpufjøll. Okkara tilfar: av donskum uppruna. | **3** |
| Sorbus x | thuringiaca | 'Fastigiata' | Thüringenroynir | Miðalstórt leyvfellandi træ. Upprent, tættvaksið vakstrarlag. Hvítar blómur og brandreyðar fruktir. Aðrastaðni ofta nýtt fram við vegum. Úr Evropa. | **2** |
| Spiraea | | 'Sigurkvistur' | Sigurspirea | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Hvítar blómur. Trívst best í góðari mold. Hetta avbrigdið er úr Íslandi. | **3** |
| Spiraea | betulifolia | | Bjarkarspirea | Lágvaksin leyvfellandi runnur. Reyðbrúnar greinar. Bløðini lík bjarkarbløðum. Hvítar blómur í tøttum klasaskjólum. Harðførur. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Natúrlig útbreiðsla: Fjareystur. Okkara tilfar: úr Danmark. | **3** |
| Spiraea | douglasii | | Douglas-spirea | Hávaksin leyvfellandi runnur. Upprent, tætt vakstrarlag, breiðir seg við rótskotum. Reyðbrúnar greinar. Purpurreyðar blómur, í tøttum samansettum øksum. Trívst best í góðari mold. Úr Alaska. | **3** |
| Spiraea | japonica | 'Goldflame' | Japansspirea 'Goldflame' | Miðalhøgur, tættvaksin, leyvfellandi runnur. Reyðar blómur, í stórum klasaskjólum á ársskotunum. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Úr Fjareystri. | **1** |
| Spiraea | japonica | 'Eirikur' | Japansspirea 'Eirikur' | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Upprent vakstrarlag. Ljósareyðar blómur í stórum klasaskjólum á ársskotunum. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Úr Fjareystri. Avbrigdið er úr Íslandi. | **3** |
| Spiraea | japonica | 'Little Princess' | Japansspirea 'Little Princess' | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Tættvaksið, kúput vakstrarlag. Ljósareyðar blómur, í stórum klasaskjólum á ársskotunum. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Úr Fjareystri. | **2** |
| Spiraea | nipponica | | Nipponsspirea | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Bogavaksnan greinbygnað. Hvítar blómur, saman í tøttum tyssum uppi á greinunum. Trívst best í góðari mold. Úr Japan. | **3** |
| Spiraea | nipponica | 'Snowmound' | Nipponsspirea 'Snowmound' | Miðalhøgur til hávaksin leyvfellandi runnur. Bogavaksnan greinbygnað. Bløðini dimmgrøn. Hvítar blómur í tøttum tyssum á miðjum sumri. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar ella girðing, sum vekstur frítt. | **2** |
| Spiraea | trilobata | | Spirea | Heldur lágur, tættvaksin, leyvfellandi runnur. Hvítar blómur. Trívst best í góðari mold. Tolir nakað av skugga. Nýtiligur til runnagirðing. Lítið royndur áður. Úr Kina. | **0** |
| Spiraea x | bumalda | 'Anthony Waterer' | Spirea 'Anthony Waterer' | Lágur, tættur og breiðvaksin, leyvfellandi runnur. Bløðini reydlig, tá ið tey spretta, seinni grøn. Ljósareyðar blómur, í klasaskjólum, á ársskotunum. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Úr Fjareystri. | **1** |
| Spiraea x | cinerea | 'Grefsheim' | Spirea 'Grefsheim' | Miðalhøgur, rundleittur og tættur, leyvfellandi runnur. Bogavaksnan greinbygnað. Bløðini grágrøn. Hvítar blómur í hópatali tíðliga á sumri. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Hóskar væl til samanplantingar ella girðing, sum vekstur frítt. Avbrigdið er alið úr Noreg. | **2** |
| Spiraea x | vanhouttei | | Spirea | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Hampiliga harðførur. Tolir nakað av skugga, men blómar best í góðum sólargangi. Blómar tíðliga á sumri, blómurnar hvítar. Hóskar væl til girðing ella sum stakrunnur. | **2** |
| Stephanandra | incisa | 'Crispa' | Stephanandra 'Crispa' | Heilt lágur, breiðvaksin, tættur, leyvfellandi runnur, ið tolir nakað av skugga. Smáar ljósar blómur. Hóskar væl til undirvøkstur. Lítið royndur áður. Úr Japan. | **1** |
| Symphoricarpos | albus | | Snjóber | Miðalhøgur leyvfellandi runnur, harðførur og kravlítil. Smáar ljósareyðar blómur, hvít ber. Tolir væl skugga. Hóskar væl til klipta | **3** |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | runnagirðing og undirvøkstur. Breiðir seg við rótskotum. Natúrlig útbreiðsla: Landnyrðingsnorðuramerika. Okkara tilfar: úr Danmark. | |
| Symphoricarpos x | chenaultii | 'Hancock' | Lágvaksin snjóber 'Hancock' | Lágur, tættvaksin, harðførur og kravlítil leyvfellandi runnur. Hóskar væl til undirvøkstur. Smáar, ljósareyðar blómur og reydlig ber. | 3 |
| Syringa | josikaea | | Sírena | Miðalhøgur leyvfellandi runnur, trívst best í góðari kálkblandaðari mold og góðari lívd. Blómurnar korkalittar til reyðbláar, anga stramt. Einstakir runnar blóma væl hjá okkum. Úr Miðevropa. | 2 |
| Syringa | prestoniae | 'Elinor' | Sírena 'Elinor' | Miðalhøgur leyvfellandi runnur, trívst best í góðari kálkblandaðari mold og góðari lívd. Blómurnar stórar, dimt korkalittar. | 2 |
| Syringa | reflexa | | Sírena | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Krevur tey alrabestu vakstrarlíkindini í góðari kálkblandaðari mold og góðari lívd. Blómurnar korkalittar. Úr Kina. | -1 |
| Tamarix | pentandra | | Tamariks | Stórur leyvfellandi runnur við reyðbrúnum greinum. Ljósareyðar blómur um heystið. Tolir saltráma og saltkenda jørð. Úr Asia. | -1 |
| Taxus | baccata | | Taks | Veturgrønur runnur. Kann gerast stórur. Hampiliga harðførur, tolir væl av skugga. Trívst best í kálkríkari jørð. Hóskar væl at tilskera. Tvíbýlisplanta, t.e. kall- og kvennplantur hvør sær. Eitrandi. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. | 1 |
| Taxus | baccata | 'Fastigiata' | Súlutaks 'Fastigiata' | Veturgrønur runnur ella lítið træ. Mjávaksin og ógvuliga seinvaksandi. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Eitrandi. Lítið royndur áður. | 1 |
| Taxus | baccata | 'Melfardii' | Súlutaks 'Melfardii' | Veturgrønur runnur ella lítið træ. Mjávaksin. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Eitrandi. Lítið royndur áður. | 1 |
| Taxus | baccata | 'Repandens' | Taks 'Repandens' | Veturgrønur, lágur, tættvaksin runnur. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Tolir væl at verða tilskorin. Eitrandi. Lítið royndur áður. | 1 |
| Taxus x | media | | Blendingstaks | Veturgrønur runnur, ið kann gerast stórur. Rættiliga harðførur, tolir væl av skugga. Trívst best í góðari, moldkendari jørð. Hóskar væl at tilskera. Tvíbýlisplanta, t.e. kall- og kvennplantur hvør sær. Eitrandi. Slagið er ein blendingur millum *T. baccata* og *T. cuspidata*. Okkara tilfar: úr Skotlandi. | 2 |
| Taxus x | media | 'Hillii' | Blendingstaks 'Hillii' | Veturgrønur runnur. Rættiliga harðførur, tolir væl av skugga. Trívst best í góðari, moldkendari jørð. Hetta avbrigdið hóskar serliga væl til tætta girðing og hóskar væl at tilskera. Tað sigst, at avbrigdið ikki setur frukt. Slagið er ein blendingur millum *T. baccata* og *T. cuspidata*. Okkara tilfar: úr Skotlandi. | 2 |
| Thuja | occidentalis | 'Fastigiata' | Thuja 'Fastigiata' | Lítið veturgrønt nálatræ. Mjávaksið, súluvaksið og tætt. Avbrigdið verður nógv nýtt sum staktræ ella til tætta girðing og hóskar væl at tilskera. Trívst best í turrlendi og góðum sólargangi. Lítið roynt áður. | 0 |
| Thuja | occidentalis | 'Golden Globe' | Thuja 'Golden Globe' | Avbrigdið er lágur veturgrønur runnur, ið er aldur úr einum nálatræi. Tættvaksin kúpur. Nálirnar gulgrønar. Avbrigdið verður nógv nýtt sum stakrunnur ella í samanplantingum og hóskar væl at tilskera. Trívst best í turrlendi og góðum sólargangi. Lítið roynt áður. | 0 |
| Thuja | plicata | | Kemputhuja | Stórvaksið veturgrønt nálatræ. Toppskotið upprent. Nálirnar mjúkar, oljugrønar, anga við handfaring. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi, har ikki er ábært. Telist millum nøkur av heimsins hægstu trøum. Kjarnaviðurin hevur serkilt góða rotverju. Tolir væl at verða tilskorin. Natúrlig útbreiðsla: Kyrrahavsstondin í Norðuramerika. Okkara tilfar: úr Alaska. | 2 |
| Tsuga | heterophylla | | Vesturamerikonsk hemlock | Stórvaksið veturgrønt nálatræ. Toppskotið hangandi. Nálirnar mjúkar, dimmgrønar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst best í góðari jørð. Tolir væl av skugga. Natúrlig útbreiðsla: Kyrrahavsstondin í Norðuramerika. Okkara tilfar: úr Alaska | 2 |
| Ulex | europaeus | | Tornarunnur | Tættvaksin miðalhøgur runnur við sera nógvum tornum. Gular blómur. Tolir væl sjórok og vindslit. Trívst best í turrlendi og góðum sólargangi. Úr Europa. | 3 |
| Ulmus | glabra | | Álmur | Stórvaksið leyvtræ, ið eldist væl. Trívst best í góðari jørð og góðum sólargangi. Nøkur stór eldri trø eru her á landi, t.d. í Havn og í Kunoy. Úr Evropa. | 2 |
| Vaccinium | corymbosum | 'Blue Crop' | Amerikonsk bláber 'Blue Crop' | Slagið verður nógv dyrkað í aldingørðum (fruktplantagum). Lítið roynt áður. | 0 |
| Vaccinium | corymbosum | 'Reka' | Amerikonsk bláber 'Reka' | Slagið verður nógv dyrkað í aldingørðum (fruktplantagum). Lítið roynt áður. | 0 |
| Vaccinium | macrocarpon | | Amerikanskur | Krúpandi veturgrønur runnur, ið kann gerast breiðvaksin við tíðini. Bløðini smá, leðurkend, døggkend á ranguni. Blómurnar hvítar ella | 0 |

Viðmælið er eitt samanumtikið skotsmál, víst í tølum: -1 = vrakað, 0 = lítið roynd, 1 = trívst vánaliga, 2 = trívst hampiliga væl, 3 = trívst frálíka væl.

Upplýsingarnir í hesum yvirlitinum eru bert okkara vegleiðandi áskoðan, ið ikki kunnu verða nýttir sum grundarlag fyri staðfesting av ábyrgd av nøkrum missi ella tapi; hvørki fíggjarligum ella í aðrar mátar.

| Slekt (genus, slægt). | Slag (species, art). | Avbrigdi (varietet, sort, clon). | Nøvn/heiti, nýtt í Føroyum. | Lýsing: | Viðmæli: |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | tranaberjarunnur | ljósareyðar; reyð ber um heystið. Berini verða nógv nýtt til at súlta, saft o.tíl. Natúrlig útbreiðsla: í Landnyrðingsnorðuramerika. Lítið royndur áður. | |
| Viburnum | lantana | | Viburnum | Leyvfellandi runnur. Tørvar tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góðan sólargang, góða lívd og góða jørð. Úr Evropa. | **2** |
| Viburnum | opulus | | Viburnum | Miðalstórur leyvfellandi runnur. Fagurlitt leyv um heystið. Blómurnar hvítar, anga. Lítið royndur áður. | **1** |
| Viburnum x | bodnantense | 'Dawn' | Viburnum 'Dawn' | Miðalstórur leyvfellandi runnur. Blómurnar hvítar. Lítið royndur áður. Úr Evropa. | **1** |
| Vinca | minor | | Smávinka | Krúpandi veturgrønur runnur, ið breiðir seg við nýggjum rótfestum úr greinunum. Vakstrarlagið kann tí lætt verða tættvaksin botnvøkstur. Bløðini eru bjartgrøn um summarið, um veturin og várið ofta meira gylt. Blómurnar eru bláar ella purpurlittar, blómingin byrjar tíðliga um várið. Eingi ávís krøv til jørðildið ella vakstrarlíkindini. Natúrlig útbreiðsla: Evropa. | **2** |
| Weigela | | ‘Styriaca’ | Klokkurunnur ‘Styriaca’ | Miðalhøgur til høgur, leyvfellandi runnur. Heldur upprent og breiðvaksið vakstrarlag. Skotini brún ella reyðbrún. Bløðini dimmgrøn. Blómurnar myrkareyðar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini. Lítið royndur áður. | **1** |
| Weigela | | 'Boskoop Glory' | Klokkurunnur 'Boskoop Glory' | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Heldur kúput vakstrarlag. Skotini grá. Bløðini grøn. Blómurnar ljósareyðar ella laksareyðar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst best í góðum sólargangi. | **3** |
| Weigela | | 'Bristol Ruby' | Klokkurunnur 'Bristol Ruby' | Miðalhøgur til høgur leyvfellandi runnur. Heldur upprent og breiðvaksið vakstrarlag. Skotini ljóst brún ella reyðbrún. Bløðini dimmgrøn. Blómurnar myrkareyðar, stórvaksnar, í smáum tyssum. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini. | **3** |
| Weigela | | 'Newport Red' | Klokkurunnur 'Newport Red' | Miðalhøgur til høgur leyvfellandi runnur. Heldur upprent og breiðvaksið vakstrarlag. Bløðini grøn. Blómurnar fagurreyðar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst best í góðum sólargangi. | **2** |
| Weigela | florida | ‘Alexandra’ | Klokkurunnur ‘Alexandra’ | Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Bløðini purpurdæmd, tá ið tey spretta, seinni á sumrinum enn meir purpurlitt. Blómurnar ljósareyðar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst best í góðum sólargangi. | **1** |
| Weigela | florida | 'Foliis Purpureis' | Klokkurunnur 'Foliis Purpureis' | Lágur, tættur, breiðvaksin, leyvfellandi runnur. Bløðini purpurdæmd. Blómurnar ljósareyðar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst best í góðum sólargangi. | **1** |



© Umhvørvisstovan - Endurskoðað útgáva juli 2011 